

# FRØÐI

2 / 2023 30. árg. kr. 48,-

**TEMA**

## Tíggju greinar um *náttúrufatan*

# Frøði *hesaferð!*

Tema í hesum blaðnum er *náttúrufatan*. Náttúran hevur eina ferð áður verið tema í Frøði. Tað var í 2013, og evnið tá var *lívfrøðiligt margfeldi og lendisnýtsla*. Greinarnar bygdu á eina ráðstevnu, sum Fróðskaparsetrið, Søvn Landsins, Náttúrugripasavnið og Búnaðarstovan skipaðu fyri.

Ein tráður í evnunum í 2013 var, at økt atlit til náttúru og vistskipanir geva okkum ferfalt aftur, tí ein náttúra, sum verður væl umsitin, kastar munandi meira av sær. Í 2013 var semja um, at føroyska náttúran verður ov hart troytt, og at hon tískil er í stórum vanda fyri áhaldandi lívfrøðiligum missi. Tað fór tí at verða neyðugt at seta tiltøk í verk beinan vegin til tess at steðga niðurpíningini av náttúruni. Tíðin var búgvin til at landbúnaður, náttúrufyrisiting og gransking í felag tóku neyðug stig at gera eina ætlan fyri burðardygga lendisnýtslu í Føroyum.

Nú sløk 10 ár seinni varð føroyska náttúran aftur viðgjørd, hesa ferð út frá einum meira hugmyndaligum sjónarhorni. Kjakið um nýggju margfeldislóggávuna vísti millum annað, at hugtakið náttúra er ikki eintýtt, men hevur ymsan týdning fyri ymisk fólk. Ráðstevnan snúði seg tí fyrst og fremst um náttúrufatan.

Ikki øll, sum á ráðstevnuni í 2022 varpaðu ljós á náttúrufatan, eru umboðað í hesi temaútgávu. Men í tíggju greinum viðgera høvundarnir ymiskar fatanir av náttúruni.

Michael Jacobæus greinar, hvat hugtakið náttúra merkir ella kann merkja. Tað er ikki lætt, tí fataninar eru ymiskar, og náttúran broytist støðugt. Neyðugt er tí at vita, hvat vit tosa um fyri at kunna bera okkum rætt at, heldur Michael Jacobæus.

Ragnheiður Bogadóttir spyr, hvussu tað ber til, at vit ikki megna at gera nakað munagott við umhvørvistrupulleikarnar. Hon heldur, at nýhugsan og nýskapan av okkara sambondum við og í náttúru eru fremsta avbjóðingin fyri 21. øld.

Suni Petersen staðfestir, at endamálið við eini nútímans náttúruvernd eigur at vera at tryggja náttúrumargfeldið og tey ymisku virðini í náttúruni - nú og í framtíðini.

Malan Marnersdóttir skrivar um náttúrufatan í føroyskari yrking. Hon sigur, at náttúra er ein av høvuðstilfarskeldunum í skaldskapi, og at náttúrufyribrigdi, serliga landsløg, eru rættiliga fast myndatilfar í yrking og prosa.

Guðrun í Jákupsstovu viðger, hvussu ymiskt vit fata náttúruna, og at talan samstundis er at fata okkum sjálvi. At taka ábyrgd av føroysku náttúruni merkir eitt nú at taka ábyrgd av, hvussu vit hyggja at henni – og harvið okkum sjálvum, sigur Guðrun í Jákupsstovu.

Lis Mortensen og Gunnar Bjarnason lýsa, hvussu føroyska náttúran slítist. Náttúrukreftirnar gera sítt, og oman á hesar kreftir koma vit menniskju, tá vit brúka náttúruna á ein hátt, sum skundar undir slitið.

Kolbrún í Haraldsstovu hyggur fram í tíð og sigur, at framtíðin er náttúrunnar fjølbroytni og vísir á vandan, um fjølbroytnið minkar. Vit skulu læra um og kanna føroysku náttúruna, fyri betur at skilja, hvussu náttúran er fyri.

Turið Sigurðardóttir umrøður *grót* í fýra yrkingum frá teimum seinastu hundrað árunum. Hon spyr, hvat grót umboðar í hesum yrkingum, og hvat tað sigur okkum um tíðina, tær vórðu til í.

Jóan Pauli Joensen hugleiðir um, at tað er eitt mark fyri øllum. Ein burðardygg menning merkir stutt sagt ein vøkstur, uttan at tað natúrliga tilfeingið versnar fyri komandi ættarliðini.

Virknasti høvundurin í Frøði, Jens-Kjeld Jensen, hevur eina „gestagrein" í temablaðnum um *snøggu skøru*, sum hann sigur er eitt afturíafturkomið slag í Føroyum.

Katrin Hoydal eigur stóra tøkk uppibornað fyri sín ídna leiklut at flyta tilfarið frá ráðstevnuni yvir í hesa Frøði temaútgávuna.

FRØÐI 2 / 2023

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG
GEVUR FRØÐI ÚT

© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.

Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045
Forsíðumynd: Eyrgjógv í Vágum.
Mynd: Pauli Djurholm

*Loyvt er at endurgeva úr Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.*

AVGREIÐSLA
Jarðfeingi, J. Paturssonargøta 32-34
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

RITSTUÐLAR
Fróðskaparsetur Føroya
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

NÝGGIR HALDARAR
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

GREINIR TIL BLAÐIÐ
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundsleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

LÝSINGAR TIL FRØÐI
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna, telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

LÝSINGARPRÍSUR
Heil síða:kr. 5.000,-
Hálv síða:kr. 3.000,-

RITUMBOÐSRÁÐIÐ
Erling Isholm, Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Fróðskaparsetur Føroya
Sámal Tróndur Johansen, Tjóðskjalasavnið
Bjørg Mikkelsen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Katrin Hoydal, Umhvørvisstovan
Lis Mortensen, Jarðfeingi
Eilif Gaard, Havstovan
Unn Patursson, Føroya Landsbókasavn

GRAFISK FRAMLEIÐSLA
OG PRENT: Føroyaprent

SAMSKIPARI
Helgi Jacobsen
helgi.jacobsen@gmail.com
tlf. 519184

RITSTJÓRN
Erling Isholm, *ábyrgd*
Birgitta Andreasen
Sissal Maria Rasmussen
Maria Nielsdóttir
Sissal Vágsheyg Erenbjerg

FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA
Heimasíða: www.frodskaparfelag.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á kontu í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 10
*Minnist til at viðmerkja navn.*










# Innihald


4 MARGFELDIÐ Í HUGTAKINUM NÁTTÚRA
Sjúrður Hammer
Ragnheiður Bogadóttir
Guðrun í Jákupsstovu

6 NÁTTÚRA ER GÓÐ OG FYRIMYNDARLIG, MEN EISINI HÆTTISLIG OG ÓND – OG NÓGV ANNAÐ
Michael Jacobæus

10 NÁTTÚRA, NÁTTÚRUFATANIR OG HVUSSU VIT SKAPA OKKARA UMHVØRVIS-TRUPULLEIKAR
Ragnheiður Bogadóttir

15 Náttúruvernd skal
TRYGGJA VIRÐINI Í NÁTTÚRUNI
Suni Petersen

17 NÁTTÚRUFATAN Í FØROYSKARI YRKING
Malan Marnersdóttir

21 AT FATA OKKARA NÁTTÚRU AT FATA OKKUM SJÁLVI
Guðrun í Jákupsstovu

28 SNØGG SKØRA – EITT AFTURÍAFTURKOMIÐ SLAG Í FØROYUM
Jens-Kjeld Jensen
Flemming Thorning-Lund

31 Føroyska náttúran slítist
– HVAT KUNNU VIT GERA?
Lis Mortensen
Gunnar Bjarnason

35 FRAMTÍÐIN ER Í NÁTTÚRUNNAR FJØLBROYTNI
Kolbrún í Haraldsstovu

41 GRÓT Í FÝRA YRKINGUM FRÁ TEIMUM SEINASTU HUNDRAÐ ÁRUNUM
Turið Sigurðardóttir

45 TAÐ ER EITT MARK FYRI ØLLUM
Jóan Pauli Joensen



# Margfeldið í hugtakinum náttúra

*Í Føroyum siga vit ofta um okkum sjálvi, at vit liva tætt at náttúruni. Okkara list og bókmentir hálova, lýsa og dramatisera sambandið við náttúruna – og kanska serliga til havið. Men hava vit í Føroyum eina øðrvísi náttúrufatan enn onnur? Ansa vit betur eftir náttúruni og okkara tilfeingi enn onnur lond?*


**Sjúrður Hammer**
**Ragnheiður Bogadóttir**
**Guðrun í Jákupsstovu**


Seinastu árini er tað vorðið alsamt meiri greitt, at umhvørvisligar kreppur gera um seg í heiminum. Jørðin gerst heitari, sjógvurin hækkar, djórasløg eru hótt, dálkingin veksur og lívfrøðiliga margfeldið minkar. Náttúruvísindini hava í áratíggju granskað og víst á, hvussu illa stendur til, men vit hava ikki megnað at gjørt tað, sum skal til fyri at venda gongdini. Trupulleikin tykist at hava við okkara grundleggjandi *náttúrufatan* at gera. Hvussu skilja vit náttúru? Og hvussu hugsa vit um okkum sjálvi sum ein part av náttúruni? Hesir heilt grundleggjandi spurningarnir eru ikki bert náttúruvísindaligir, men *tvørvísindaligir*, og hava stóran týdning fyri, hvussu vit skipa okkara viðurskifti millum samfelag og náttúru.

Nógv kjak hevur verið í seinastuni um náttúruna í Føroyum, og serliga í sambandi við nýggju *náttúruverndarlógina* gjørdist greitt, at hugtakið „náttúra“ er ikki eintýtt, men hevur ymsan týdning fyri ymisk fólk. Sostatt gerast spurningarnir um umhvørvis-








kreppuna eisini viðkomandi í føroyskum høpi. Hvat merkir tað til dømis at fiska burðardygt? Hvar gongur markið millum umhvørvisvernd og vinnulig áhugamál? Hvørji sjónarhorn gera seg galdandi í kjakinum um ferðavinnu, gongd í haga, landbúnað og lendisnýtslu sum heild? Hvønn týdning kann eitt slag av fugli, ein blóma ella ein klukka hava fyri føroysku náttúruna og føroyingar sum heild? Hvussu gera spurningar um virði seg galdandi, tá vit hugsa um náttúru? Tosa vit um virði í sjálvum sær, peningaligt virði, mentanarligt virði, ella kanska vistfrøðiligt virði?

Við hesum ymsu spurningum í huga skipaði Fróðskaparfelagið fyri einum tvørfakligum tiltaki, sum setti evnið *føroysk náttura og náttúrufatan í nútíð, fortíð og framtíð* í miðdepilin. Ein fyriskipanarbólkur varð settur, og fólk við ymsari fakligari bakgrund kundu senda uppskot inn um framløgur, sum viðgjørdu hetta fjølbroytta evnið. Í mars 2022 var ráðstevna við heitinum: Hvat er náttúra? Føroysk náttúrufatan í fortíð, nútíð og framtíð hildin við fyrilestrum og listaligum framløgum. Framløgurnar kundu snúgva seg um t.d. náttúrufatan og burðardygd, umhvørvisetikk, náttúrufatanir og list, umhvørvishugvísindi og økokritikk, umframt náttúrufatanir í søguligum føroyskum høpi: siðsøga, kvæði, sagnir, átrúnaður og lendisnýtsla, náttúrutilfeingi og náttúru*lesiføri*. 18 ymiskar framløgur vóru á ráðstevnuni.

Henda útgávan av Frøði er eitt serrit við greinum frá nøkrum av framløgunum á ráðstevnuni. Skráin fyri tiltakið og stroyming av allari ráðstevnuni er at síggja á https://frodskaparfelag.fo/hvat-er-nattura/

Stýriskipanarbólkurin var: Ragnheiður Bogadóttir, Guðrun í Jákupsstovu, Sjúrður Hammer, Michael Jacobæus, Lis Mortensen, Sanna Dahl, Elisabeth Skarðhamar Olsen, Gunnar Bjarnason, Kolbrún í Haraldsstovu, Jógvan D. Hansen, Magnus Gaard, Petur Steingrund, Rakul Á. Jakobsen, umframt táverandi nevndin í Fróðskaparfelagnum: Birgitta Andreasen, Erling Isholm, Kim Bergkvist, Bergur Rønne Moberg og Katrin Hoydal.



# Náttúra er góð og fyrimyndarlig men eisini hættislig og ónd
## *- og nógv annað*

*Hvat er náttúra, og hvussu fata vit náttúruna? Vit nýta orðið náttúru nógvar ferðir dagliga og verða díkt undir í miðlunum við lýsingum og ræðumyndum, sum, hóast boðini peika í ymsar ættir, fáa náttúruna skoytta upp í málburðin so ella so. Hvat merkir náttúra, og hví er hetta hugtak so torført at handfara?*



**Michael Jacobæus**
mjacobaus@hotmail.com
Lendisarkitektur

### Innleiðing til ráðstevnu um náttúrufatan

Flestu okkara vita ikki so nógv um náttúruna, tá ið av tornar. Ikki um náttúruna, sum alt – tann stóra samanhangin. Vit hugsa ikki so nógv um hana – ikki til dagligt, har so nógv annað er at takast við, hóast náttúran er grundarlagið fyri, at vit eru í hesum heimi, her hon støðugt er í og um okkum.

Náttúran er góð. Náttúran er sunn og fyrimyndarlig. Eitt gott vørumerki, um hon bara ikki fær vald á okkum og rámar okkara mentan og uppaling.

Náttúran er eisini hættislig og órein. Í miðøld umboðaði hon tað verðsliga og holdbundna og freistaði tey veiku í trúnni burtur frá tí andaliga og æviga. Náttúran er lúnut og umleypandi, og fyri sakleys fólk kann hýrurin á henni støðugt hava vanlagnur við sær. Og her snýr tað seg ikki um sjálvgivnar broytingar.

Nú á døgum verður náttúran ofta fatað sum eitthvørt uttanfyri; vit síggja hana í brotum, týdd og tulkað so, sum menniskjan nú einaferð sær alt – frá egnum áhugamálum og royndum ella fakligum virksemi og frá egnum ímyndum – litað av tí, vit meta vera nýtiligt ella ei.

Nútíðarmenniskjan sær náttúruna fyrst og fremst sum eitt tól. Nútíðarmenniskjan tykist loyst frá náttúrunnar bondum og kann, sum vesturlendingur við forrættindum, enn, velja ella vraka náttúruna. Menniskjan brúkar náttúruna, tá ið hon fer til fjals, finnur sær ráevni úr henni ella dyrkar jørðina. Vit lesa náttúruna alt eftir, hvussu vit vilja brúka hana og nema okkum vitan alt eftir, hvussu vit kunnu fáa sum mest burtur úr henni, um tað snýr seg um upplivingar í fjøllunum ella at troyta fiskin úr sjónum.

Harafturímóti sær nútíðarmenniskjan neyvan tað, sum røkkur út um okkara náttúrufatan – tær smáu broytingarnar – tey óvæntaðu sambondini ella tey, ið tykjast gagnleys, sum virka øvut av arbeiðslagnum, sum vit vanliga skipa okkara vitan eftir, men sum hóast alt hava týdning.

Vit síggja ímyndir av náttúruni, men varnast ikki sjálva náttúruna skilt sum hana, ið er givin, og sum er fortreyt fyri øllum lívi – ella í minsta lagi tí lívi, sum vit hámeta. Heildin og sambondini eru ikki tað fyrsta, sum eygað sær.

Vit tosa nógv um náttúruna, men eru við tíðini bundin av tí, sum málið megnar at orða og av teimum myndum, egnum ella felags, sum vit hava við okkum, og sum mana fram í okkum tað, ið hugsast kann, men sum kanska ikki hava veruligt rótfesti í teimum stóru spurningum, sum eru verri at greina.

So fyri at okkara hugsan og ímynd av náttúruni ikki skulu stirðna og forða fyri nýggjari vitan og innliti, mugu vit javnan kanna, um tey eru haldbar



*Heitið á málninginum er náttúruræðsla.*
*J.F. Willumsen hevur málað í umleið 1914.*
*Málningurin hongur í Tjóðlistasavninum í Oslo*



og meta tey upp ímóti náttúruni, sum hon tekur seg út í løtuni. Kanska var okkurt, sum vit seinast ikki góvu okkum far um; kanska finst nýggj vitan og innlit nú, sum avdúkar nýggj mynstur og sambond, sum krevja, at vit hyggja øðrvísi at náttúruni – ikki við útgangsstøði í gamlari fatan av kosmos, ikki sum sýnislutir ella blandingar av væl lýstum evnum, men eitt margfeldi við djúpum sambondum, sum bjóða okkara vanahugsan og -vitan av. Vit hóma kanska okkurt heldur óítøkiligt, men sum kortini onkursvegna er til, og sum vitanargrundað orð eiga at verða sett á.

Um vit ikki av forvitni og tráan eftir innliti støðugt og umaftur vendu hvørjum steini og bjóðaðu okkara vitan av um náttúruna, høvdu vit framvegis livað í fávitsku um tær sníkjandi broytingar rundan um okkum, sum í fyrstu syftu kunnu tykjast ósjónligar.

## Íðan, hvat er náttúran tá?

„Handan ta eyðsýniligu skipan, haðani okkara sansir ávirkast, er eitt óskil, ella skil, sum sendir á øðrum frekvensum, og sum ikki letur seg tøla av máli skilvísisins, men kann hava ovurhonds stóran týdning fyri kensluna av heildini og halda henni uppi". Soleiðis sigur høvundurin Inger Christensen í síni ritroynd um tilvild og lívstreytir. Okkara sansir virka á ávísum bandbreiddum og tykjast avmarkaðir av tí einstaka menniskjanum og tess evnum at geva sínar royndir víðari um heimin kring okkum.

Og náttúran broytist støðugt. Vit hava leingi havt høvi at ásanna tað, men hava vent tað blinda eygað til tann veruleika, at orsøkin til broytingarnar liggur í, hvussu menniskjan umsitur tað eyðsædda. Og fyri heimsins íbúgvar kunnu broytingarnar fáa álvarsamar fylgjur. Tí er tað neyðugt at umhugsa nógvar av okkara áskoðanum, sum liggja til grund fyri okkara náttúruumsiting, av nýggjum og spyrja: Eru hesar enn galdandi?

## Vit kunnu spyrja:

Er hugtakið náttúra ella mátin vit higartil hava fatað og tosað um náttúruna sum eitt amboð hjá menniskjuni partur av trupulleikanum?

Er menniskjunnar sjálvsøkna hugmynd av náttúruni, sum støðugt sær okkara uppruna sum lutir, tilfeingi og myndir, ein lágfloygd og skaðilig náttúrufatan, tá ið av tornar?

## Men hvat er náttúra tá?

Í tíðarritinum *Nature* var í 2020 ein grein, har rithøvundarnir í sambandi við 150-ára føðingardagin hjá tíðarritinum nú hildu, at tíðin var komin til at nágreina hugtakið og tess ymisku merkingar upp gjøgnum tíðirnar fyri at kunna skilja og virka eftir tí í nútíðini. Sambært rithøvundunum er hugsanin um náttúruna rótleys, og hennara støða og avleiðingarnar av menniskjunnar handfaring av henni elvir til alsamt meira ampa. Neyðugt er at vita, hvat vit tosa um fyri at kunna bera seg rætt at og venda gongdini.

Rithøvundarnir halda tí, at hugtakið næstan er høpisleyst, um eingin roynd verður gjørd at nágreina, hvat tosað verður um. Sigast kann, at tað upprunaliga var eitt hugsað fyribrigdi, sum skuldi brúkast til at seta orð á og skyna ímillum tað, sum menniskjan hevði funnið fram til, og tað óítøkiliga fjølbroytnið, sum treytaði lívið á jørð.

Átrúnaðarligar, heimspekiligar og náttúruvísindaligar hugmyndir hava upp gjøgnum tíðirnar sett síni spor í bókmentir og myndlist og hava broytt hugsanir og mál, sum ávirka okkara nútíðar náttúrulýsing og samveru við náttúruna.

Sambært niðurstøðuni hjá rithøvundunum er „náttúra" eitt óítøkiligt hugtak, sum ikki kann lýsast eintýtt, tí tað fevnir um nógv ymisk viðurskifti og verður lýst á ymiskan hátt upp gjøgnum tíðirnar. Tað fevnir ikki bert um „tað úti har", tað grøna, djór og plantur og vakrar upplivingar, men um samanvavd fyribrigdi og tilgongdir, sum virka upp gjøgnum tíðir, sum røkka longur enn tað stutta lívið og stuttskygdu ætlanir menniskjans og mentanarinnar – í torgreiddum sambondum, sum byggja á dagsins eygleiðingar og skilvit.

Tað merkir ikki, at hugtakið er ónýtiligt. Tað merkir bara, at ímyndirnar, sum knýta seg til hugtakið, støðugt skulu dagførast.

Tá ið vit tosa um náttúruna, mugu vit tí greina gjølliga, hvat hugtakið snýr seg um.

## Men hvat halda vit tá at náttúran er í dag?

Vit noyðast tískil at samskifta um náttúruna á einum tíðarhóskandi máli í samsvari við dagsins avbjóðingar og teir veruligu trupulleikarnar í nútíðar náttúruumsitingini. Hetta samskifti fer millum annað fram gjøgnum lóggávuna og mátan, hon tulkast.

Vit síggja fegin eina nýggja lóg, sum verjir náttúrunnar margfeldi betur enn tann gamla, t.e. eitt nýtt og betri grundarlag fyri samskifti um náttúruumsitingina. Hesa ferð snýr tað seg tó ikki bert um at



*Neyðugt er við nýggjari náttúruverndarlóg, sum verjir náttúrunnar margfeldi betur enn tann gamla. Myndin vísir vøkstur á Klubbanum, har seyður ikki sleppur framat. Mynd: Árni Jakobsen*

verja náttúruna av navni, men lóggávan skal innast inni vera grundvøllurin undir okkara eftirkomarum.

Gamla náttúrufriðingarlógin frá 1970 er fyrnd. Hon byggir á varðveitslu og verju av tjóðskaparligum vakurleikavirðum og er rótfest í náttúrufatanini í romantikkini, men henni vantar stórliga nøkur amboð til at viðgera og taka støðu til dagsins náttúruavbjóðingar. Nú skal ikki einans tað glæsiliga verjast – vakurt útsýni og upplivingar – men heilt einfalt fortreytirnar fyri varðveitslu av lívi í framtíðini undir umstøðum, sum eisini rúma øðrum verum. Tíðin er komin at meta gamla vanahugsan um náttúruna av nýggjum, so eitt betri og týðiligari umsitingargrundarlag kann skrivast inn í lógarinnar bókstav og anda.

Eg skal viðganga, at tað ikki ber til at allýsa náttúruna við fáum orðum, men tó í minsta lagi at skera til og byrja eitt orðaskifti um, hvat náttúruhugtakið í veruleikanum snýr seg um. Tað er ein avbjóðing, men vit kunnu byrja við náttúrunnar margfeldi og spyrja við støði í hennara verandi støðu heldur enn í fornum hugmyndum um, hvat hon snýr seg um.

## Fýra spurningar

Við støði í tí, sum er nevnt omanfyri, setti Michael Jacobæus vegna fyrireikararnar ráðstevnuna, samstundis sum hann setti fýra spurningar:

Hvussu hevur náttúran tað veruliga, sum hon kemur til sjóndar her í Føroyum?

Hvørjar hugmyndir liggja til grund fyri okkara náttúrufatan?

Hava vit umsitið okkara part av heimsins náttúru burðardygt?

Kann náttúran varðveitast á ein hátt, sum ger tað liviligt í Føroyum fyri komandi ættarlið?



*„Hvør ert tú?"*
*Linoleumsskurður. Sissal Matras*

# Náttúra, náttúrufatanir og hvussu *vit skapa okkara umhvørvistrupulleikar*

*Heimurin er í umhvørvisligari kreppu, og náttúruoyðingin heldur fram hóast allar ávaringarlampur lýsa. Hvussu ber tað til at vit ikki megna at gera nakað munagott við trupulleikarnar? Tí at ráðandi fatanirnar av sambandinum millum náttúru og menniskja eru ótíðarhóskandi. Nýhugsan og nýskapan av okkara sambondum við og í náttúru eru fremsta avbjóðingin fyri 21. øld.*




**Ragnheiður Bogadóttir**
ragnheidurb@setur.fo
Ph.d. í humanvistfrøði
Lektari í samfelagsvísindum
á Fróðskaparsetri Føroya


Hvønn týdning hava náttúrufatanir? Svarið, sum verður givið í hesi greinini, er, at náttúrufatanir eru grundleggjandi orsøkin til teir umhvørvistrupulleikarnar, vit hava í dag, m.a. minkandi lívfrøðiligt margfeldi og veðurlagsbroytingar. Í øllum mentanum eru náttúrufatanir avgerandi fyri, hvussu menniskju skipa búskaparligu sambondini millum náttúru og samfelag, tað merkir, at náttúrufatanir eru avgerandi fyri, hvørt menniskju megna at troyta avmarkaða náttúruríkidømið burðardygt, og hvørt tey megna at býta hetta ríkidømi nøkulunda javnt sínámillum.

Í okkara heimi í dag ber til at staðfesta, at tað gongst einki serligt á hesum báðum økjum. Samstundis sum umhvørvistrupulleikarnir vaksa, veksur eisini ójavnin.

Í hesi greinini spyrja vit millum annað: hvørjar eru okkara náttúrufatanir í Føroyum, og hvaðani koma tær? Hvussu eru tær broyttar søguliga, og hvørja ávirkan hava hesar broytingar havt á, hvussu vit troyta okkara náttúrutilfeingi? Endamálið við at viðgera slíkar spurningar er sjálvsagt, at tilvit um okkara náttúrufatanir kann hjálpa okkum framá eftir eini meira burðardyggari kós.

## Umhvørvisvísindaliga paradoksið

Vísindaliga hava vit ongantíð vitað so nógv um náttúruna og umhvørvið, sum vit vita í dag. Vit hava heldur ongantíð vitað so nágreiniliga sum nú, at okkara umhvørvistrupulleikar eru menniskjaskaptir og so umfatandi, at tað av álvara hóttir menniskjaliga vælferðargrundarlagið. Tí kann tað tykjast margháttligt, nú vit vita meir enn nakrantíð og eru ríkari enn nakrantíð, at vit ikki megna at loysa trupulleikarnar.

Ein orsøk til hesa marghháttligu støðu er fatanin av, at okkara umhvørvistrupulleikar standast av skeivari tøkni, og at vit tí fáa loyst umhvørvistrupulleikarnar við at betra um tøknina. Fyri at skilja, hví vit hugsa um náttúru og umhvørvi, sum vit gera, er neyðugt at fara søguliga til verka og hyggja at, hvaðani hesar fatanir koma, og í hvørjum politiskum og ideologiskum samanhangi tær gjørdust ráðandi. Heilt yvirskipað kunnu vit siga, at okkara modernaða náttúrufatan er úrslit av upplýsingartíðini. Broytingarnar í okkara náttúrufatanum komu sostatt ikki dettandi av himli, men vuksu fram úr einum ávísum søguligum og politiskum samanhangi í einum Europa, sum um hetta mundið við valdi legði meginpartin av náttúruríkidøminum í heiminum undir seg.

Fyri at lýsa høvuðseyðkennini fyri ráðandi modernaðu náttúrufatanina kunnu vit eitt sindur einfalt vitja tríggjar vísar menn, ið livdu mitt í hesum heimsveldinum: faðirin at flokkingarfrøðini, faðirin at modernaðari heimspeki og faðirin at búskaparfrøðini.



## Náttúran og tríggir vísir menn

Náttúran, okkara jørð, hevur, so frægt vísindini vita at siga okkum, verið til í góðar fýra milliardir ár. Eina lítla milliard av árum seinni byrjaði lívið á jørðini. Fyri umleið 200.000 – 300.000 árum síðani kom burtur úr hesum lívsgongdum modernaða menniskjað, sum í árinum 1758 gav sær sjálvum vísindaliga heitið *homo sapiens*, sum merkir „vísur maður". Vit kenna Carl von Linné sum faðirin at flokkingarfrøðini, sum í dag ger okkum før fyri at máta og meta um lívfrøðiligt margfeldi. Linné nýtti seg sjálvan sum útgangsstøði fyri heitinum *homo sapiens*, men hann bólkaði samstundis modernaða menniskjað í nakrar høvuðsbólkar eftir húðarliti og landafrøði. Tey, ið høvdu hvíta húð, høvdu sambært Linné eisini eina ávísa atferð, tey vóru millum annað uppfinningarsom og vís. Eyðkenni fyri fólk við myrkari húð var hinvegin, at tey vóru dølsk, lúrin og vanskettin. Harvið skrivaði Linné seg inn í eina siðvenju av vísindaligari rasismu, ið tíverri enn spøkir. Hugsanarhátturin um menniskjað, og hvar tað hoyrdi heima í náttúruni, ið var ráðandi hetta søguliga tíðarskeiðið í Europa, elvdi sum kunnugt til nærum ófatiligar ræðuleikar, trælahald og fólkamorð, og minnir okkum á, at náttúrufatanir hava meira grundleggjandi og umfatandi týdning og ávirkan, enn vit vanliga geva okkum far um.

Eini 100 ár frammanundan, at Carl von Linné skrivaði um *homo sapiens*, skrivaði ein annar vísur maður orðini „Cogito Ergo Sum". Hetta var sum kunnugt Descartes, sum ofta sigst vera faðirin at vesturlendskari heimspeki, tað vil siga okkara modernaðu heims- og náttúrufatan. Serliga eyðkennið fyri hesa sokallaðu kartesisku heimsfatan er býtið av tilveruni í tveir ontologiskar høvuðspartar: í tað materiella og tað andaliga, í kropp og sál, náttúru og mentan. Kartesiska heimsfatanin lærir okkum, hvar mørkini eru í náttúruni, millum kropp og sál/tilvit, náttúru og mentan. Tað, ið hevur sál og tilvit og er mentað, er umfatað av okkara moralsferu, og vit læra at objektivisera restina. Meðan fólk í flestu øðrum mentanum hava fatað seg sjálvi og síni samfeløg sum part av náttúruni, so setur kartesiska heimsfatanin menniskjað uttan fyri náttúruna.

Um nakað sama mundið, sum Carl von Linné sat í Svøríki og hugsaði um menniskja og náttúru, sat Adam Smith, faðirin at búskaparfrøðini, og hugsaði um ríkidømi og moral. Smith grundaði millum annað um, hví summar tjóðir blivu ríkar og aðrar ikki. Hann eyðmerkti tríggjar høvuðsorsøkir: arbeiðsbýti, produktivitet og fríhandil. Minni týdning fyri greiningina hjá Smith hevði víðkaða atgongdin til náttúruríkidømi og bíliga ella ókeypis arbeiðsmegin, sum koloniveldini um hetta sama tíðarskeiðið við valdi tóku sær.

Descartes, Linné og Smith høvdu allir góðar umstøður at hugsa, og teirra hugsanir hava havt stóra ávirkan á, hvussu vit í dag fata menniskja og náttúru og búskaparligu sambondini harímillum. Smith fær ofta heiðurin av, at ráðandi hugsanin í heiminum í dag er, at um eitthvørt loysir seg fíggjarliga, ja, so loysir tað seg. Hetta, tí at „ósjónliga hondin" syrgir fyri at býta alt so sera væl, um bara vit øll bera okkum sjálvsøkið at og royna at framleiða sum mest fyri at vinna okkum sjálvum so nógv sum gjørligt. Kanska ikki so løgið, at vit oyða okkara náttúrugrundarlag, og at ójavnin í heiminum veksur.

*Mynd. Janus á Húsagarði*



## Náttúrufatanir í Føroyum fyrr og nú

So hvørt sum umhvørviskreppan stendur við og versnar, er eisini áhugin fyri møguligum loysnum vaksandi, og eitt granskingarevni innan hetta økið

fæst við alternativar, sokallaðar relationellar epistemologiir ella náttúrufatanir. Hesar náttúrufatanir og hugsanir hava ofta skipað búskaparligu sambondini millum menniskju og náttúru væl meira burðardygt, enn vit megna í dag. Okkara (lang)ommur og (lang) abbar til dømis (Bogadóttir 2020a).

Eyðun Andreassen (1985) hevur lýst, hvussu føroyingar fyrr, „tey gomlu", fataðu sítt samband við náttúruna og sítt pláss í náttúruni. Náttúrufatanin hjá føroyingum var animistisk, tað merkir, at náttúran hevði sál, hon var íbygd við øllum møguligum verum og sterkum, men óútrokniligum kreftum, og tað ráddi tí um at bera seg at sambært ávísum moralskum grundreglum um virðing og hóvsemi.

Eisini henda náttúrufatan vaks fram søguliga í einum ávísum samfelagspolitiskum høpi, tá føroyingar livdu í einum veruleika, har burðardygg nýtsla av náttúrutilfeingi var neyðug, tí fíggjarpolitiska støðan hjá føroyingum loyvdi ikki sum í dag at kalla óavmarkaða atgongd til tilfeingi aðrastaðni frá.

Í bókini *Fiskivinnan sum broytingarамboð hjá amtmanninum* (Isholm 2020), lýsir Erling Isholm við nógvum áhugaverdum dømum samanstoytin millum hesa upprunaligu føroysku náttúrufatanina og koloniala hugsanarháttin, sum Linné, Descartes og Smith umboða í hesi greinini.

Eitt dømi er fatanin hjá føroyingum av fiskiskapi, sum vit kunnu samanbera við ráðandi fatanina í dag. Grundleggjandi var gamla fatanin, at um ov nógv varð fiskað, fór fiskurin at hvørva (Isholm 2020:219). Hugsanin um at troyta havið so hart, sum til bar, stríddi sostatt ímóti moralsku grundreglunum í føroyska samfelagnum og teirri relationellu náttúrufatanini, har vælferðin hjá náttúruni og vælferðin hjá menniskjum varð fatað sum ein heild. Í eini modernaðari heimsfatan, ið byggir á eitt ontologiskt býti av tilveruni millum náttúru og menniskja, verður moralska grundreglan vend á høvdið. Tað gerst ómoralskt at lata tilfeingið „fara fyri skeytið" í náttúruni heldur enn at taka tað inn í samfelagsbúskapin. Tað er orsøkin til, at vit føroyingar í dag einki samvitskubit kenna av, at okkara tøka av fiski úr havinum fyri hvønn íbúgva vaks 175 ferðir ígjøgnum 20. øld (Bogadóttir 2020a). Høvdu vit eisini verið errin, um vit megnaðu at halda vakstrarferðina í heildarveiðu ígjøgnum 21. øld? Um so varð, so hevði okkara heildarveiða farið upp um 100 milliónir tons. Heildarfiskiveiðan í heiminum í dag liggur um 90 milliónir tons. Kunnu vit so ikki bara framleiða alifisk í staðin? Vit kunnu lata sum um, men ósjónliga hondin tekur 2 kg av fiski úr okkara havi, hvørja ferð hon framleiðir 1 kg av laksi (Bogadóttir 2020b).

Tað er henda sama náttúrufatanin, sum gerst alsamt meira ráðandi í okkara gerandis- og arbeiðsdegi. Har vit alla tíðina endurtaka fyri hvørjum øðrum, sum var tað ein náttúrugivin sannleiki, at vit mugu økja um okkara framleidni. Vit mugu fiska meira – og tá vit ikki kunnu fiska meira, mugu vit fara í holtur við reyðæti. Vit mugu bora fleiri tunlar, útbúgva fleiri lesandi, flyta fleiri fjøll. Ja, enntá tað at oyða ávís djórasløg hóttir í dag við at loysa seg. Fyri góðum 200 árum síðan var tað Born kommandantur, ið helt, at tað hevði loyst seg at oytt kópin í Føroyum. Isholm (2020:194) skrivar, at Born kortini ikki væntaði „at hann fór at fáa undirtøku fyri tí, so leingi sum føroyingar hildu seg vera ættaðar frá kópi í 9. liði".

Vit vita tó ikki, hvussu føroyingar fataðu henda



*Mynd. Janus á Húsagarði*



skyldskap við kóp. Um tey veruliga vistu seg at vera ættað frá kópi í júst 9. liði, ella um hetta í líka stóran mun var ein máti at teppa kommandantin. Tað merkir, at ættarbandið til kóp í ávísan mun var myndamál, ið staðfesti eina náttúrufatan, har tað at oyða eitt djóraslag var óhoyrt. Tað minnir um, tá ið (vísinda)fólk í dag kunnu finna uppá at siga nakað so óvísindaligt sum til dømis, at „kundin hevur altíð rætt", ella „náttúra menniskjunnar er sjálvsøkin". Náttúruvísindaliga kunnu vit staðfesta, at allar hesar fatanir og útsagnir um kóp og kundar eru nøkulunda líka fjákutar. Samfelagsvísindaliga vita vit, at tá fólk bera seg at, sum eru tær sannar, (endur)skapa tey ein ávísan heim, har útsagnirnar gerast alt meira sannar.

*Heiðamynd*



Tá vit føroyingar skulu greiða fremmandafólki frá, hví vit drepa grind, so eru vit onkursvegna greið yvir hetta. Vit greiða frá, at vit taka einans tað, okkum tørvar, vit býta tað javnt okkara millum, og vit fara so virðiliga við djórunum, sum til ber. Vit troyta við øðrum orðum okkara tilfeingi burðardygt, meðan hini modernaðu dálka og oyða og vita ikki, hvaðani matur kemur, men keypa sínar ófrælsu og illa viðfarnu høsnarungar og grísar í stórhandlunum (Bogadóttir og Olsen 2017). Trupulleikin er, at tá vit so eru liðug at vera í grind, ja, so er ikki annað at gera enn at pakka okkara gomlu náttúrufatan saman og fara aftur til arbeiðis, har hvørki ovurnýtsla av tilfeingi ella viðferð av djórum er moralskt viðkomandi – ósjónliga hondin tekur sær av tí fyri okkum, skilst. Hevur ein alilaksur rætt til frælsi, ella var tað bara grindahvalurin? Vit spyrja kundan.

## At enda

So hvussu kunnu vit aftur taka burðardygd í álvara, virða djór, menniskju og náttúru, sum høvdu tey sál, uttan at vit av teirri orsøk mugu førka okkum, í rotuskóm, aftur í tíð, og seta kópar inn í okkara ættartalvur?

Tá vit spegla okkum í øðrvísi náttúrufatanum, skilja vit lættari, á hvønn hátt okkara egnu fatanir og hugsanir um umhvørvi og náttúru eru úrslit av søguligum og politiskum umstøðum, og hvørjar avleiðingar hesar ymisku fatanir hava á okkum sjálvi, á onnur menniskju og á náttúru. Tá vit skilja, hvussu okkara náttúrufatanir søguliga vórðu til, er eisini lættari at bjóða ráðandi fatanum av, at ímynda okkum aðrar møguleikar og at menna meira hóskandi náttúrufatanir.

## Keldur:


Andreassen, Ey. (1986). *Úr søgn og søgu*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur

Bogadóttir, R. (2020a).The social metabolism of quiet sustainability in the Faroe Islands. *Sustainability*, *12*(2), 735.

Bogadóttir, R. (2020b). Blue Growth and its discontents in the Faroe Islands: An island perspective on Blue (De) Growth, sustainability, and environmental justice. *Sustainability Science*, *15*(1), 103-115.

Bogadóttir, R. og Olsen, E.S. (2017). Making degrowth locally meaningful: the case of the Faroese grindadráp. *Journal of Political Ecology*, *24*(1), 504-518.

Isholm, E. (2020). *Fiskivinnan sum broytingaramboð hjá amtmanninum*. Fróðskapur.



# Náttúruvernd *skal tryggja virðini í náttúruni*

*Umframt at hava eitt eginvirði, hevur náttúran fleiri grundleggjandi virði sum tilfeingi hjá fólki, eitt nú nyttu- og brúksvirði, upplivingarvirði, samleikagevandi virði og so framvegis. Endamálið við eini nútímans náttúruverndar er at tryggja náttúrumargfeldið og tey ymisku virðini í náttúruni nú og í framtíðini, eitt nú at vit skulu varðveita og gagnnýta lívmargfeldið á ein burðardyggan hátt.*

*Mynd: Finleif Mortensen*

Náttúruvernd í Føroyum hevur higartil verið bygd á eina gamla og ótíðarhóskandi náttúrufriðingarlóg og ótíðarhóskandi náttúrufyrisiting, sum í høvuðsheitum er mannað við leikfólki. Lógin er frá 1970, men hevur sín uppruna í fimmtiárunum og leggur serliga dent á tað vakra og sjáldsama í náttúruni heldur enn margfeldið av dýrum, plantum, náttúrusløgum og øðrum, sum væntast kann av eini nútímans náttúruverndarlóg.

Á vári í 2023 samtykti løgtingið nýggja náttúruverndarlóg, har endamálið er at varðveita margfeldið í náttúruni og at gagnnýta náttúrutilfeingið á ein burðardyggan hátt. Lógin kemur í gildi 1. januar 2024.

Yvirskipaða endamálið við lógini er at verja ta føroysku náttúruna við øllum hennara margfeldi og at røkja lív-, landslags- og jarðfrøðimargfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.



**Suni Petersen**
suniP@us.fo
Umhvørvismál
Umhvørvisstovan



*Mynd: Fjallasíðan hjá Gurið á Facebook*

## Villleiðandi mótstøða

Tilgongdin at fáa nýggja náttúruvernd hevur verið bæði tung og drúgv, og mótstøðan móti lógini hevur verið stór, og ágangurin harður, serliga frá teimum, sum varða av høgunum. Ført er fram, at um lógin verður samtykt, er talan um størstu ognartøku í Føroya søgu, at lógin er størsta inntriv í føroyska jarðarlóggávu í nýggjari tíð, at ræðisrætturin verður tikin frá festarum og ognarum, og at inntrivið er beinleiðis brot á ognarrættin. Hetta er alt beinleiðis skeivt og villleiðandi. Galdandi náttúrufriðingarlóg hevur eins víðfevndar heimildir til at seta friðingar í verk.

Eisini verður ført fram, at kærumøguleikin er gjørdur munandi verri enn í verandi skipan. Hetta er eisini bæði skeivt og villleiðandi. Í veruleikanum verður rættartrygdin hjá festarum og eigarum styrkt við tað, at avgerðir kunnu roynast bæði hjá Føroya kærustovni og í Føroya rætti. Avgerðir hjá Yvirfriðingarnevndini kunnu hvørki kærast ella leggjast fyri Føroya rætt.

Sagt verður eisini, *at tey, sum varða av høgunum, duga best at umsita lendið og djóralívið burðardygt*. Spurningurin er, um hetta ikki eisini er bæði skeivt og villleiðandi. Í flestøllum høgum í Føroyum er ov nógvur seyður, og lendið verður bitið meir, enn tað tolir. Vórðu hagarnir umsitnir burðardygt, høvdu teir verið betur fyri, og jarðrivið hevði verið minni.

*Lógaruppskot*



**Løgtingslóg
um
náttúruvernd
(Náttúruverndarlógin)**

**Kapittul 1
Endamál og gildisøki o.a.**

*Endamálið við løgtingslógini*

**§ 1.** Endamálið við løgtingslógini er at …ekja margfeldið og tær vistfrøðiligu …ilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

*Gildisøki*

**§ 2.** Løgtingslógin fevnir um føroyskt landøki, eisini áir, vøtn, ósar og løkir, og føroyskt sjóumveldi.

*Allýsingar*

**§ 3.** Í hesi løgtingslógini skulu hesi hugtøkini skiljast soleiðis:

1) Fremmand livvera: livvera, sum ikki hoyrir til nakað slag ella nakran stovn… sum finst natúrliga á staðnum.
2) Heysting: at henta ella savna inn plantur ella plantupartar, eisini ber… fruktir, í útilívi og vinnu.
3) Innflutningur: at føra í land úr øki… uttan fyri gildisøkið hjá løgtingsló…
4) Livmargfeldi: margfeldið av … vistskipanum, sløgum og íleguburð… innan fyri sløgini og tey vistfrøð… sambondini teirra millum.
5) Livvera: einstaklingur av plantu… dýrum og smáverum, íroknaði… partar, sum kunnu norast ella f… íleguútilfar.
6) Náttúrumargfeldi: livmargfel… landslagsmargfeldi og jarðfrøðimargfeldi, sum ikki… høvuðsheitum er úrslit av á… menniskjum.
7) Náttúruslag: einsháttað sla… sum fevnir um allar livand… umhvørvistættirnar, sum…

## Nýggja lógin skal grundast á tøka vitan

Við nýggju náttúruverndarlógini eru karmarnir lagdir fyri eini nútímans náttúrufyrisiting, sum skal grundast á bestu tøku vitanina um náttúruna.

Men nýggja náttúruverndarlógin fer ikki einsamøll at loysa allar átrokandi spurningar fyri at verja náttúruna. Partur av galdandi náttúrufriðingarlóg verður framvegis í gildi. Tað vil eitt nú siga, at tað framvegis verða atlit at tí vakra og sjáldsama í náttúruni heldur enn margfeldið av dýrum, plantum, landsløgum og øðrum, sum verður avgerandi fyri, um loyvi verður givið til at byggja bygningar, gera vegir, tunlar og annað úti í náttúruni.

Náttúruvernd og lendisplanlegging hanga óloysiliga saman, og tí er tørvur á, at atlit at náttúrumargfeldinum verður ein óloysandi partur av tilgongdini, tá lendi verða løgd út til ymisk endamál.

Tí er eisini tørvur á eini nútímans lendislóggávu, sum ásetur karmar fyri eini lendisætlan, og sum verður gjørd við støði í fullgóðari vitan um okkara náttúru.

Vit hava ikki nøktandi vitan um føroysku náttúruna fyri at kunna hava eina nøktandi náttúruvernd og fyri at gera eina fullgóða lendisætlan.

Tí er sjøtul settur á at kortleggja vátlendi í Føroyum, sum er eitt týdningarmikið náttúruslag við einum ríkum dýra- og plantulívi. Eisini er sjøtul settur á at gera ein dátugrunn, sum skal goyma vitan um føroysku náttúruna. Vitan, sum er alneyðug fyri náttúruvernd og lendisætlan. ■



# Náttúrufatan í *føroyskari yrking*

Ruth Smith:
'Útsýni móti Lopra' 1954

*Náttúra er ein av høvuðstilfarskeldunum í skaldskapi. Náttúrufyribrigdi, serliga landsløg, eru rættiliga fast myndatilfar í yrking og prosa. Náttúra og landsløg kunnu vera bæði motiv og tema, tvs. eitt landslag kann vera tað ítøkiliga, sum verður nýtt til at viðgera og lýsa eina almenna hugsan, kenslur ella sinnisstøður.*[1]

Hugtakið 'náttúra' er ikki eintýtt. *Føroyska orðabókin* sigur m.a., at náttúra er:

1. hin ítøkiligi umheimurin, umhvørvið við øllum livandi og lívleysum, sum ikki er skapað av menniskjum
2. sjálvrunnin fyribrigdi í veruleikanum sæð sum sjálvvirkið kervi, *náttúran hevur sína føstu gongd*;
3. upphavligir el. íbornir eginleikar, skaplyndi, natúr

Vit síggja, at náttúra bæði er ítøkiligt fyribrigdi, tað, sum er sjálvrunnið, og tað íborna.

Skaldskapur tránýtir serliga tað, at náttúra kann ímynda menniskjaligar eginleikar og lyndi. Í gomlu kvæðunum er hon ítøkilig sum leiktjøld, ið síggjast í niðurløgum sum „Nú lystir meg í dansin at gá/ meðan rósur og liljur tær grógva væl", „Rennur, rennur foli mín á grønari grund" og „So grøn er tú lindin".

Í miðøld til uml. 1700 stýrdi kirkjan, hvussu yrkjararnir fataðu og lýstu náttúruna. Viðhvørt glapp henda almenna stýringin, og landsløg kundu koma „fyri 'reint' sum fjálgir glottar".[2] Slíkir 'reinir' náttúruglottar eru gomlu kvæðaniðurløgini um grønar lundir, rósur og liljur. ▶




**Malan Marnersdóttir**
Professari, dr.phil.
Føroyamálsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya


1 Greinin er ein stytt útgáva av grein míni „Náttúra í føroyskum yrkingum" 2018: Frændafundur 9. Ritstjórn Höskuldur Þráinson og Hans Andrias Sølvará. Hugvísindastovnun. Reykjavík: 11-23.

2 Emmeche, Claus og Bredsdorff, Thomas. Av netinum 7.6.2017: http://denstoredanske.dk/Sprog,_religion_og_filosofi/Filosofi/Menneskets_grundvilk%C3%A5r/natur



*Frimod Joensen: 'Føroysk klettastrond' 1959*

## Náttúran sum Guds opna bók

Tjóðskaparyrkingin gjørdi føroysku náttúruna til landslag, ið hon lýsti, so tey syngjandi kundu og kunnu ogna sær hana og identifisera seg við landslagið. Málið og landslagið so at siga gjørdu tjóðskaparkensluna, skapaðu ta felags hugsanina, ið skuldi til, fyri at øll kundu taka landið til sín sum sítt og kenna seg sum eitt fólk.

„Eg oyggjar veit" eftir Fríðrik Petersen lýsir, at „áir renna vakrar har/ og fossa nógv", í góðum summarveðri er tað „ein sjón, eg veit, tú vilt/ væl gloyma seint". Náttúran er mest góð og framum alt vøkur, yrkingin nemur bara leysliga við tað hóttandi og vandamikla. Stormurin verður lættur og yndisligur í samanberingini „bylgjurnar tær *rúka av stað*/ sum hin *skjótasta hind*". Stormurin ímyndar styrki: „brimið stórar klettar ber/ langt upp á møl", men hann gevur eisini høvi til stuttligar avbjóðingar, tí „tá bát at temja gaman er/ við stýrisvøl". Yrkingin temur ta harðligu náttúrumegina, ger hana meinaleysa. Yrkingin ger landið lítið og ikki serliga gróðrarríkt, men finnur kortini, at „líðin elur seyð/ og havið fisk/ so fæst við Guds hjálp dagligt breyð/ á føroyings disk", sum niðurlagið undirstrikar: „Gud signi mítt føðiland Føroyar". Náttúran veitir tað, sum er neyðugt, og her lesur yrkingin náttúruna sum „Guds opnu bók", ið er ein fatan hjá kirkjuni, at menniskjuni kunnu lesa skaparverkið sum eina bók.[3]

## Upphevjaðar náttúruupplivingar

Frá Janusi Djurhuus hevur føroysk yrking brúkt náttúruna sum tilfarskeldu og veitara av sublimum, upphevjaðum upplivingum. Tað síggja vit í yrkingini „Ódn" hjá Janusi og „Náttúran" hjá Christiani Matras.

Tað sublima hava vit eldri dømi um í prosalýriska tekstinum „Føroyar" eftir Sverra Patursson. Í „Ódn" stendur yrkingar-egið trygt á strondini og eygleiðir stormar, ið leika fríir, og bylgjur, ið kvøða sum „valkyrjan óð", meðan hon „heitt tystandi eftir reystmanna blóð/ til bardagan reyk avstað". „Lúðrarnir duna sum toran", stormurin er eitt havfostrað trøll, og har er deydningadansur yvir „kirkjugarðsvøll", meðan hjartað í yrkingar-egnum „titar í øði/ av reystleika, dirvi og frøi". Talan er ikki bara um illveður, men um tað dirvi og ta frøi, yrkingar-egið kennir:

*(...) tú, fría stormanna land*  
*og høvdingjaligt á at sjá,*  
*tá kvetti tú snøggliga trældómsins band*  
*og tendraði frælsis logandi brand,*  
*sum trøllaræðsluna vá, –*  
*tá leit eg á mátt mín og megi,*  
*sum áður Sigmundur frægi.*

Hesa sublimu kenslu og fragd upplivir yrkingar-egið í vandaleysari frástøðu frá ódnini. Hanus Andreassen/ Kamban sigur, at frælsishugsanin í yrkingini er tjóðskaparlig.[4] Talan er líka skjótt um andligt frælsi og fría hugsan, tí yrkingar-egið ber seg saman við tjóðarhetjuna Sigmund, sum var nýhugsandi maður í síni tíð.[5]

Náttúran er her farin at mynda sinnið, og tað øtiliga skapar sinnisrørslur millum pínu og fragd, ið næstan kennast lívshóttandi.

## Náttúran krevur at verða latin í orð.

Náttúran fær egnan vilja tillutaðan í yrkingini „Náttúran" eftir Christian Matras:

*Eg legði oyrað ov nær inn at tær,*  
*eg hoyrdi tað, sum eingin visti var,*  
*tí fekk eg aldri frið, tú elti meg*  
*og baðst í úrtíð meg at loysa teg.*

Ørindið angar av romantikki. Yrkingar-egið hevur serliga gott samband við náttúruna, hon hevur trokað seg inn á og inn í tað, soleiðis at tað ongantíð fær frið. Yrkingar-egið skal „loysa" náttúruna og orða

3 Sigurðardóttir, Turið, 1989, „Nýggjar tíðir, nýggjur songur". Brá 13/14: 30-45.

4 Andreassen, Hanus 1994 J.H.O. Djurhuus Ein bókmentalig ævisøga, 185.

5 Seinni tók ein kapping seg upp um plássið sum ta fornu tjóðarhetjuna. Hans Andrias Djurhuus gjørdi í yvirliti sínum Føroya søga (1924) Trónd til hann, „ið vardi Føroya frælsi móti norskum ágangi, meðan Sigmundur var talsmaður fyri kongsvaldið". Seinni haldi eg, at yrkingin er vorðin lisin sum allegori um politisku strembanina eftir sjálvstýri.

seg fyri hana. Á henda hátt hoyrir ella lærir yrkingar-egið 'tað sum eingin visti var'. Her er náttúran virkin, hevur eina megi, sum ger øgiliga sterkt vart við seg. Megin er andalig, „ein megintægr í míni sál", og yrkingar-egið kennir í sær „rúmdargos" og

*í ómegd pipraðist sum minsta bos,*
*tá aftur harðnaði í mær eitt lag,*
*sum tú mær árla inn í oyrað kvað.*

Samansetingin av ótta og fragd ger upplivingina sublima. Hetta er ein opinbering og ein yrkingarskrá, sum ritverkið sum heild svarar.

Hjá Chr. Matras, Janusi Djurhuus og Williami Heinesen er náttúran ein persóngjørd megi. Hjá Williami ímyndar hon sinnalagið hjá unglinginum í fyrstu yrkingasøvnunum, hjá Christiani setir hon krøv, so yrkingar-egið óttast kanska fyri, at tað ikki fær eftirlíkað kravinum nóg væl. Hjá Janusi er eingin ivi um, at yrkingar-egið kann tað, sum tað setur sær fyri – tað ógvast við, men bakkar ikki.

## Náttúran svarar aftur

Hjá Tóroddi Poulsen stendur einastaðni, at „nátturan leggur ikki petti í/ um vit eru góð ella ónd/ tí hon er hvørki" (Poulsen 2015:16). Hetta er tann ultima uppgerðin við náttúrumyndburðirnar:

*SLIT*
*mánin sær so bleikur út*
*so hann sleppur ikki við*
*í hesa yrkingina*
*tað ger sólin heldur ikki*
*hon er alt ov skroypilig*
*og skal ikki brenna upp*
*ímillum míni orð*
*havi heldur ikki samvitsku til*
*at brúka orðið jørðin*
*tí hana hava vit pínt so illa*
*ja sjálvur alheimurin*
*fær eisini frið fyri mær*
*tí hann tímir eingin at lesa um*
*í eini yrking við ongum mána*
*og ongari sól ella jørð.*

Her er eingin friðsæla og eingin sublim uppliving. Alt bendir á ta mannaskaptu oyðingina av jørðini og alheiminum. ▶

*Havið kvalist í burturkasti, sum á ávísum leiðum í Kyrrahavinum gerst til heilar oyggjar.*
*Mynd av alnótini*





Eisini í Føroyum ávara heilsumyndugleikarnir um plastik í maganum á fugli. Mynd: Ingrid Taylar

Tann nýggja umhvørviskritiska yrkingin er lærd og akademisk hjá Kim Simonsen, ið ikki fírir fyri at nevna vísindafólk sum myrka vistfrøðingin Timothy Morton og hugtakið „hyperobjekt", ið sipar til so ófatiligar og umfatandi tíðar- og rúmdarvíddir, at tað beinir fyri vanligum hugsanum um, hvat eitt ting, ein lutur í roynd og veru er. Greiðasta dømi um slíkt hyperobjekt er tann risastóra nøgdin av plastlutum í sjónum:

*Skógurin er rustlittur, brúnur og reyður,*
*í sólini skyggir hann sum plastik.*
*Í Stillahavinum er ein nýggj oyggj av plastik*
*av fløskum og bikarum.*

Hesar plastikkoyggjar eru hyperobjekt, tað ófatiliga ræðandi og umfatandi nýggja sublima, sum eingin trygg frástøða er til, tí, sum Kim skrivar, tey „klistra seg at okkum":

*Vit eru bundin til hyperobjektini.*
*Í bilinum brennur bensin,*
*bensin og tungolja eru flótandi bein*
*av skeljum og dinosaurum.*
*(...)*
*Tá ið eg skrivi á talvuna við kriti,*
*seti eg 70 milliónir gomul spor, hvønn dag.*

Hjá Kim Simonsen er ilt at fáa eyga á eina leið burtur úr óskilinum, men hjá Lív Mariu Róadóttur Jæger ger náttúran í prosayrkingini „Vetur" sjálv vart við eina møguliga loysn:

*Landslagið er frost. Hygg, trøini eru hvít. Sum tankarnir, ið greina seg eftir landavegi og út á óbygdan bø. Veturin, eitt slag av mjørka; eitt gjøgnumskygt slør, og eg síggi litskiftið. Grøsini, fryst miðskeiðis í samrøðu – hvat mundu tey práta um, áðrenn kuldin kom? Kanska skipaðu tey seg móti myrkrinum, sum legðist, hóast tey ynsktu tað øðrvísi. Kanska fundaðust tey á gáttini, beint sum heystið stilnaði, og vindurin vaks. Tað er tað sama á hvørjum ári – kuldin og innlitið og samrøðurnar, sum máttu bíða í bítandi kava.*

Trøini eru tankar, og grøsini hava tosað saman. Yrkingin spyr, hvat gras(róta)rørslurnar mundu tosa um, og gitir, at tær kanska fundaðust um at skipa seg móti óynskta myrkrinum fyri at enda turrisliga at staðfesta, at hetta er ikki fyrstu ferð, at „innlitið og samrøðurnar (...) máttu bíða í bítandi kulda". Her eru sálarkveiktu planturnar í holt við at taka stig móti myrkrinum – oyðileggingini.

Henda viðurkenningin av, at menniskjan sjálv er náttúra, hoyrir til nýggja yrkingarrákið, tann umhvørvistilvitaða og kritiska skaldskapin.

At lýsa náttúruna sum keldu til veldigar kveikjandi upplivingar er um at vera ein farin tíð í føroyskum skaldskapi. Í staðin er komin ein vist-kritiskur hugburður um ikki minni skakandi tilburðir enn ódnir, sum ikki altíð verða eygleiddar í tryggari frástøðu.

## Siteraðar bókmentir:

Djurhuus, J.H.O.D *Yrkingar 1898-1948, 1988.*
Jæger, Lív Maria Róadóttir *Hvít sól*, 2015.
Matras, Christian *Leikur og loynd*, 1975.
Poulsen, Tóroddur *glopramjólk*, 2015
Simonsen, Kim *Desembermorgun,* 2015.

■

# At fata okkara náttúru
## *at fata okkum sjálvi*

*Føroyski fotografurin, Tróndur Dalsgarð, legði herfyri nakrar myndir út á sosiala miðilin Instagram. Myndirnar, ið vóru tiknar í Føroyum av altjóða myndafólkum, vístu ikki tey vanligu motivini, sum okkum dámar best at síggja av Føroyum. Har vóru til dømis ikki myndir av gomlu húsunum úti á Reyni, vitanum í Kalsoy, kirkjuni í Saksun, Tindhólmi, kvinnum og monnum í føroyskum klæðum, lundum ella seyði.*

Myndirnar, ið Tróndur legði út, vóru tiknar í Havn. Ein teirra, sum danski myndamaðurin Daniel Hjorth tók, var av trimum dreingjum, sum sótu á hvør sínum skutara uttan fyri ta ramponeraðu kioskina Aktiv í Hornabø og mintu ikki sørt um hugtakið *Atlantic cowboys* hjá Firouz Gaini.

Onnur eftir sama myndamann vísti trý vindeygu uppi yvir hvørjum øðrum í gráu læknaíbúðunum á Eirargarði, har ein kvinna stendur í vindeyganum í miðjuni og hyggur út. Kvinnan er innrammað av vindeyganum, sum er innrammað av fasaduni. Vit síggja ikki himmalin uppiyvir bygninginum ella grøna heyggin, sum bygningurin stendur á – bert ta gráu, heldur døpru fasaduna. Tróndur lýsir sína gleði um hesar myndirnar – hvussu vakrar tær eru í litum, motivi, huglagi og kompositión – men greiðir samstundis frá, at tær vórðu illa móttiknar av føroyingum sjálvum, sum ikki dámdu at verða avmyndaðir á henda hátt. Tróndur hugleiðir, um hetta kann vera tí, vit eru vorðin so von við „landslagsporno“, at vit vilja ikki viðurkenna onnur sjónarhorn enn tey, ið vísa glansmyndina av grønum og dramatiskum landsløgum, gomlum flagtaktum húsum ella elskuligum seyði og lundum.

Henda eygleiðingin hjá Tróndi er áhugaverd, tí hóast hon sipar til myndir av tí gerandisliga lívinum í Havn, so sigur hon møguliga nakað meir um okkara egnu sjálvsfatan. Mótstøðan móti myndunum hjá Daniel Hjorth kann eisini hugsast at vera grundað á tað ójavna valdsbýtið millum Føroyar og Danmark, sum ofta ger, at føroyingar kenna seg defineraðar og lítilsvirdar, tá Føroyar verða lýstar í útlendskum, og kanska serliga donskum, miðlum.

Út frá anekdotuni um myndirnar hjá Daniel Hjorth ber til at siga, at okkum dámar ikki, at føroyingar og Føroyar verða fataðar og ►



**Guðrun í Jákupsstovu**
gudrun.jakupsstovu@unibe.ch
ph.d. lesandi í enskum og norðurlenskum bókmentum
Universitetið í Bern, Sveis





*Kvinna í glugga.*
*Mynd: Daniel Hjorth*

lýstar sum eitt dapurt og grátt stað. Hinvegin gremja vit okkum í øllum førum minni um tær mongu „landslagspornografisku" myndirnar av Føroyum, sum *eisini* koma í altjóða miðlar. Soleiðis hóvar tað okkum eyðsæð betur at verða sædd.

Temað í hesari útgávuni av Frøði snýr seg ikki um sjálvsfatan, men um náttúrufatan. Men hvussu ymisk eru hesi hugtøkini í veruleikanum? Ber til at tosa um føroyska náttúrufatan og ikki samstundis tosa um okkara sjálvsfatan? Í hesari greinini ætli eg at hugleiða um, hvussu føroysk sjálvsfatan leggur seg upp at myndamotivum og lýsingum av føroyskari náttúru og djóralívi, hvussu tey verða kensluliga lýst, og hvussu tey eru treytað og ávirkað av okkara støðu sum oyggjaland.

## Oyggjaímyndir

Í vesturlendskari mentan og bókmentum hava oyggjar eina langa og drúgva søgu sum mentanarlig súmbol fyri tað, ið er avbyrgt og isolerað, men eisini tað, sum er tilafturskomið, primitivt og eksotiskt. Vit kenna helst øll søguna hjá Daniel Defoe um Robinson Crusoe – mannin, sum skolar upp á eina oynna oyggj og má læra at lívbjarga sær í einari primitivari og villari tilveru. Ella hvussu við heimskendu yrkingini hjá John Donne, „No Man Is an Island"? Her verður oyggin nýtt sum metaforur fyri menniskjaligt einsemi mótvegis meginlandinum, ið ímyndar menniskjaligt samanhald og tilknýti. Í bókini *Islands of the Mind – How Western Culture Created the Atlantic World* (2004) greiðir søgufrøðingurin John Gillis frá, at oyggjar eru ikki bert nakað, vit hugsa *um,* tær eru eisini nakað, vit hugsa *við.* Altso, tá vit hugsa um isolatión, um avbyrging, so er tað ofta oyggin sum metaforur, sum fyrst rennur okkum til hugs.

Men hvussu hongur hendan metaforiska fatanin av oyggjum so saman við tí veruliga lívinum hjá okkum, sum liva, virka og hoyra til í einum oyggjasamfelagi? Flestu okkara vita sjálvandi væl, at tvørturímóti at vera avbyrgd, so er okkara tilvera sum oyggjasamfelag ómetaliga tongt at umheiminum – av at vera tilknýtt. Vit innflyta tað mesta av okkara mati, innbúgvi, tilfari og elektronikki. Vit innflyta eisini máliskur og meiningar úr bæði donskum og enskum mentanar– og tíðindatilfari. Alt, sum vit gera, eta, tosa um og læra um, dregur træðrir til umheimin. So um onkur spurdi okkum, sum búgva í Føroyum, um vit kenna okkum isolerað, so høvdu vit helst hildið, at hesin tankin er rættiliga burturvið. Og tó. Hóast vit í gerandisdegnum liva eitt lív, sum er tongt at umheiminum, so er tað sum, at vit onkuntíð eisini sjálvi lata okkum tøla av oyggjaímyndini. At vit hugsa *um* okkum sum oyggjasamfelag *við* ímyndini av teirri oydnu oynni.

Tað eru í hesum døgum skjótt tíggju ár síðani, at Visit Faroe Islands (VFI) kunngjørdi sítt ómetaliga væleydnaða ferðavinnuátak: „Unspoiled, Unexplored, Unbelievable". Flestu føroyingar minnast óivað hetta átakið best sum teir báðar lýsingafilmarnar, sum vórðu gjørdir í sambandi við hetta átakið. Her sóu vit eina mynd av Føroyum, har veðrið (næstan) alla tíðina var gott, har fólk hugnaðu sær til konsertir á sandinum á G!, har seyðurin rann frælsur í grønu fjøllunum, og har fuglar sveimaðu millum tey steyrrættu bergini. Samstundis fjaraðu tey mongu „un"-slagorðini inn og út av myndunum ("A land *un*explored", „*un*tamed nature", „*un*touched by time"), meðan sangurin „Far Away" hjá Eivør Pálsdóttir setti tónan og tað droymandi huglagið.

Tey mongu „un"-slagorðini dúvaðu beinleiðis upp á oyggjaímyndina, sum tekur fram oynna (ella oyggjalandið) sum nakað, ið er ónortið, óuppdagað og tíðarleyst. Nakað, sum stendur í stað og sostatt er øðrvísi enn meginlandið. Men tað var samstundis týdningarmikið, at tað, sum var „ónortið" og „óuppdagað", ikki bleiv sett í samband við tað primitiva, so ein javnvág mátti finnast. Ein javnvág, ið bæði spældi upp á mentanarligu hugtøkuna av oyggjum, men sum samstundis vendi tilafturskomnu stereotypuni bakið.

## Visit Faroe Islands og føroysk sjálvs- og náttúrufatan

Tað fyrsta brotið, vit síggja í summarfilminum hjá VFI, vísir ein eldri mann, sum situr í mjúkum morgunljósi og egnir, áðrenn hann fer til útróðurs. Sostatt byrjar filmurin við einari tilvísing til tað siðbundna og søguliga føroyska lívið. Men beint sum vit síggja fiskimannin sigla út av støðni, skiftir brotið til ein yngri mann, sum stendur og hyggur út gjøgnum køksvindeygað í einum nýmótans húsum, meðan hann stingur smátalarar í oyruni og ger seg kláran at fara út at renna.

Á henda hátt skiftir filmurin regluliga ímillum at vísa, hvussu tað siðbundna og tað nútímans livir saman í samljóði í føroyskum gerandislívi. Fólk, ið ganga í fjøllunum, eru ílatin hátøknilig uttanduraklæði; vindjakkar frá Deuter og stivlar úr vatn-dyggum Gore-Tex tilfari, men tey drekka eisini vatn beint úr ánni og svimja nakin í fjallavøtnum, sum tey koma framvið á sínari ferð. Filmurin ger sostatt greitt fyri hyggjaranum, at føroyingar eru nútímans fólk, ið nýta nútímans útgerð til at *vera í* náttúruni, men tey virðismeta eisini og eru sum samanrunnin *við* náttúruna, sum er rein og ja, „unspoiled". Vit síggja, hvussu kavað verður eftir sjógæti, og hvussu fólk stutt eftir njóta hesa stuttfluttu delikatessuna umborð á Norðlýsinum aftur við ▶




*Dreingir á skutara.*
*Mynd: Daniel Hjorth*




*Skíggjamynd frá lýsingafilmi Visit Faroe Islands, „Unspoiled, Unexplored, Unbelievable".*

einum snapsi. Hýrurin er róligur og lættur – „soleiðis eru vit, soleiðis gera vit", tykist boðskapurin vera. Tað er hyggjaranum greitt, at føroyska havið, náttúran og vatnið er reint, tilfeingið er ríkt, og tað er greitt, at føroyingar eru eitt fólkaslag, sum bæði virðismetir og hevur gagn *av* náttúruni.

Hesi tíggju árini hava føroyingar ofta kritiserað og við speisemi víst á tey mongu „un" slagorðini, ið seta fram eina í-so-glansbílætisliga mynd av Føroyum – tí vit vita jú væl, at oyggjar okkara hvørki eru ónortnar ella óspoleraðar. Men hóast føroyingar høvdu kritiskar og ironiskar viðmerkingar til slagorðini, so vóru tey ikki mong, um nakar, sum høvdu nakað ilt at siga um *motivini* – av manninum, sum rennur upp á fjallatindin, av teimum dramatisku, steyrrættu bjørgunum, ella tí leskiliga sjógætinum, sum gestirnir umborð á Norðlýsinum so ómakaleyst njóta. Vit dugdu óivað væl at síggja, at her var smurt tjúkt uppá – men kunnu vit nokta, at okkum dámdi tað, vit sóu?

Franski sosiologurin Pierre Bourdieu menti í 1977 hugtakið „habitus", sum hann einfaldliga definerar sum „tað, mann er", altso, hvussu tað samfelagið, menniskju vaksa upp í, ávirkar og treytar, hvat tey eta, halda, arbeiða við, hvørji ítriv tey hava, hvørji virði tey hava o.s.fr. Um vit hugsa um dømini frá VFI, so er greitt, at tað eru lýsingar av føroyingum, *sum njóta og nýta føroyskt náttúrutilfeingi,* sum er drívmegin í filmunum. Altso verður føroyskt habitus lýst sum beinleiðis knýtt at okkara náttúru- og tilfeingi. Við øðrum orðum, er tað eins og samasum-tekin verður sett ímillum føroyska sjálvsfatan og føroysku náttúruna – sum at vit skilja okkum sjálvi ígjøgnum føroysku náttúruna.

Kanska tú nú situr og hugsar, „hetta er ein lýsingafilmur! Sjálvandi er hetta ikki realistiskt!" Tað er púra rætt, og eg skal ikki harta VFI fyri, at tey bara gera sítt arbeiði. Hetta eru lýsingafilmar, sum í roynd og veru als ikki eru gjørdir til føroyingar, men til ferðafólk.

Tað, eg royni at kanna, er: Í hvussu stóran mun taka vit føroyingar slíkar lýsingar av okkum sjálvum til okkum? Í hvussu stóran mun trúgva vit upp á hesar lýsingarnar? Ella, um ikki annað, hvussu lítið mótmæla vit teimum? Eg royni at skilja, hví vit mótmæla áðurnevndu myndum hjá Daniel Hjorth og góðtaka myndirnar av grønum fjallatindum og nýtiknum kræklingum.

## Mentanarligar vørur og kenslulig tilknýti

Í mentanarfrøðini verður tosað um eitt hugtak, ið kallast „affekt". Í meira gerandisligum máli sipar hetta heilt einfalt til, hvønn leiklut kenslur og kenslulig tilknýti spæla í okkara einstaka og kollektiva medviti.

Um vit aftur hugsa um føroyska sjálvs- og náttúrufatan, so er greitt út frá filmunum hjá VFI, at sterkar kenslur eru knýttar at hesum fjallatindum, seyðinum, fiskinum, sjógætinum og flagtekjum. Hetta ger seg eftir mínum tykki eisini galdandi uttan fyri tær fantasi-Føroyar, sum vit síggja hjá VFI.

Hugsa um vangamyndirnar hjá Harriet Olafsdóttir av seyðinum í blómukransi. Makrelmotivini hjá Shisa Brand. Og sjálvandi, ullina frá føroyskum



*Skíggjamynd frá lýsingafilmi Visit Faroe Islands, „Unspoiled, Unexplored, Unbelievable".*

seyði, sum Guðrun & Guðrun við sera góðari móttøku hava ment til eina burðardygga mótavøru. Vit eru, upp á nógvar mátar, umringað av slíkum myndamotivum – av fittum seyði, bleytari ull, vakrari náttúru og fiski.

Hóast eg ikki vil kritisera hesi motivini í sær sjálvum, so haldi eg samstundis, at hesin estetikkurin leggur upp til avmarkaðar kensluligar reaktiónir: at vit eru góð við seyðin, at vit eru takksom fyri ullina, og vit eru errin av at vera ein fiskivinnutjóð.

Spurningurin gerst so: Hvørjar avleiðingar hevur hetta? Tá vit umringa okkum við vørum og myndum av okkara náttúrutilfeingi, sum fyrst og fremst leggur upp til hesar avmarkaðu kenslurnar, so stúri eg fyri, at vit gerast minni før at skilja og tosa kritiskt um tær avbjóðingarnar, sum okkara náttúra og umhvørvi hevur. Og um hvussu okkara egna náttúrusamband als ikki bert er harmoniskt, men tvørturímóti ofta problematiskt.

Veruleikin í Føroyum er tann, at okkara samband við náttúruna er bæði trupult og merkt av mótstríðandi áhugamálum. Vit gerast alsamt meira varug við, hvussu nógvi seyðurin ávirkar lívfrøðiliga margfeldið, hvussu alivinnan dálkar okkara firðir, hvussu hagin nógvastaðni er skrædnaður, at vátlendi verða drenað, og hvussu vit skulu handfara spurningin um gongd í haga. Hvussu kunnu vit estetiskt rúma hesum fløkta veruleika? Og hvat kunnu aðrar kenslur læra okkum?

Í 2011 gav føroyski rithøvundurin Vónbjørt Vang út yrkingasavnið *Millumlendingar.* Sum heitið leggur upp til, so snúgva yrkingarnar seg um millumstøður av ymsum slag – relationellar, vitanarligar, kensluligar o.s.fr. Í sambandi við spurningin um føroyska sjálvs- og náttúrufatan er yrkingin „Enn ein fráferð" serliga áhugaverd at kanna. Yrkjara-eg'ið situr í einum flogfari ávegis úr Føroyum. Reglan „tað *var*" sigur okkum, at eg'ið hevur verið í Føroyum og er nú á veg avstað aftur – við brostnum vónum. Huglagið í yrkingini er dapurt, men lýsir samstundis eina vetrarmynd av Føroyum, sum ikki er ókend, sum t.d. við reglunum: „regn januar 2008 / stormur streymslit / ein yvirkoyrdur seyður". So hvørt, sum yrkingin flytur seg, tykist huglagið at gerast lættari: „vit eru alt nærri sólini / men langt burtur heimani".

Sum hesar reglurnar vísa, so er okkurt instinktivt vónríkt í lýsingini av at „nærkast sólini", men reglurnar lýsa samstundis eina sterka ambivalenta kenslu við tí fylgjandi regluni: „men langt burtur heimani". Heimið, Føroyar, stendur sostatt í andsøgn við tað vónríka, sum sólin umboðar. At flúgva frá heiminum er eisini sorgarbundið.

Tað kann hugsast, at dapra huglagið í yrkingini er styrkt av, at yrkingin tykist sipa til fíggjarligu kreppuna í 2008, sum eisini ávirkaði Føroyar og var merkt av stórum ótta fyri fólkafráflyting. Men annað enn at nevna árstalið, so er tó onki, sum vísir til fíggjarligar trupulleikar, men yrkjara-eg'ið tykist heldur at stríðast við at kenna seg aftur í tí føroyska landslagnum. Úr flogfarinum hyggur eg'ið niður á fjøllini – tey fjøllini, sum eru grøn og vøkur í filmunum hjá VFI – og sigur: „eg ræðist hatta fjallið". Fjallið umboðar her tað siðbundna og konservativa, ið bert vil hava yrkingar, ►



*Dálking frá eini smoltstøð í Víkarbyrgi.*

ið ríma, og sum snúgva seg um „roðan yvir nestindar / [og] sjólátnar menn“. Landslagið, og fjallið, eru her nýtt sum metaforar fyri tað politiska landslagið í Føroyum, men tað er áhugavert, hvussu politiskt afturhaldssinni her verður sett í samband við náttúrulýsingar, ið hálova føroysku náttúruni og monnum, ið settu lívið í vanda á sjónum. Yrkjara-eg'ið kritiserar sostatt ikki bara politiskt afturhaldssinni, hon kritiserar eisini afturhaldssinnaðar náttúrulýsingar.

Á hendan hátt minnir yrkingin um filmarnar hjá VFI, tí hon knýtir eisini føroyska sjálvsfatan saman við føroyska náttúrufatan, tó við einum týdningarmiklum muni – yrkjara-eg'ið hjá Vónbjørt Vang stríðist ímóti. Eg'ið ger greitt, at hon „kvalist“ av krøvum um afturhaldssinnaðar náttúrulýsingar, og lýsir samstundis eina andsøgn til tær Føroyar, vit síggja hjá VFI. Í filmunum hjá VFI síggja vit, hvussu tað siðbundna og tað nútímans sampakkar, men hjá Vónbjørt Vang vísir reglan „ein yvirkoyrdur seyður“ tvørturímóti, hvussu tað siðbundna og nútímans bresta saman.

## Minni hálovan, meiri konflikt

Sum eg havi roynt at víst á í hesari greinini, so leggja filmarnir hjá Visit Faroe Islands og yrkingin hjá Vónbjørt Vang upp til, at føroysk sjálvsfatan er sterkt knýtt at føroyskum náttúrulýsingum. Eg kundi ímyndað mær, at hetta ikki er nakað, sum bert er galdandi fyri hesi bæði dømini, men møguliga nakað, ið er meira víðfevnt í føroyskari mentan. Munurin millum filmarnar hjá VFI og yrkingina hjá Vónbjørt Vang er, hvørjar kenslur lýsingarnar av føroysku náttúruni fáa fram. Filmarnir hjá VFI vísa føroyingar sum eitt fólkaslag, sum livir í samljóði við náttúruna, og sum setur ómetaliga høgt tað tilfeingið, náttúran veitir okkum. Afturímóti, so vísir yrkingin „Enn ein fráferð“, at samband okkara við náttúruna als ikki bert er harmoniskt, og at okkara tilknýti broytist alt eftir fíggjarligum støðum og mentanarligum rákum.

Í hesum tíðum við veðurlagsbroytingum er tað neyðugt, at vit læra at rúma øðrum náttúrulýsingum og sostatt loyva øðrum kensluligum tilknýtum. Í staðin fyri bert at hálova fiskinum, ullini og grønu fjøllunum mugu vit eisini viðgera ambivalentu kenslurnar, tá vit lesa um „ein yvirkoyrdan seyð“, ein dálkaðan fjørð ella ein skaddan haga uttan stórvegis av lívfrøðiligum margfeldi.

Tí hevur tað týdning, at vit stuðla og seta krøv til mentanina: bókmentir, filmslist, myndlist o.s.fr. Tað er her, at vit kunnu granska kompleksitetin og mótsetningarnar í okkara tilknýti. Soleiðis kunnu vit vónandi menna nýggj kensluligt tilknýti og læra, at tað er gott at vera ambivalent, at seta spurningar og ikki fáa einføld svør. At taka ábyrgd av føroysku náttúruni merkir eisini at taka ábyrgd av, hvussu vit hyggja at henni – og harvið okkum sjálvum.



## Keldur


Ahmed, Sara. *Collective Feelings.* Theory, Culture and Society vol. 21, 2004, p. 25-42

Bourdieu, Pierre. *Outline of Theory of Practice.* Cambridge University Press, 1977.

Gillis, John R. Islands of the Mind: *How the Human Imagination Created the Atlantic World.* Palgrave Macmillan, 2004.

*Unspoiled, Unexplored, Unbelievable – The Faroe Islands.* YouTube, uploaded by Visit Faroe Islands, 16 Aug. 2013, *https://youtu.be/okKiWf_oZVI.*

*Vang, Vónbjørt. Millumlendingar. Forlagið Eksil, 2011.*

Jákupsstovu, Guðrun í. '*But I love you Faroes, you loser'. A cultural analysis of space, affect, commodities and island representations.* MA Thesis Comparative Cultural Analysis, University of Amsterdam, 2019.


## „Enn ein fráferð"

enn ein fráferð
tað var okkurt
vónríkt við at koma
aftur á klettarnar
regn januar 2008
stormur streymslit
ein yvirkoyrdur seyður
vit bíða á lendingarbreytini
ein strongur av orðum ið flýtur saman
vit flúgva tvørtur ígjøgnum skýggj
tær vøkru flogternurnar bjóða mat í
smáum plastbakkum
sólin trokar seg ígjøgnum smáu flogfarsvindeyguni
vit eru alt nærri sólini
men langt burtur heimani

eg ræðist hatta fjallið
tað hyggur ákærandi at mær
krevur eina yrking av mær
av tí góða gamla slagnum
við rími
og gomlum orðum
um roðan yvir nestindar
um sjólátnar menn
og mergjaðar hetjur
eg kvalist
men eg elski teg Føroyar tín rukka
eg fari altíð aftur til tín
sum til ein køvisligan elskara
eg ikki kann gera tað liðugt við

Vónbjørt Vang



*Mynd 1. Snøgg skøra í Hoyvík 3. juli 2023.*



**Jens-Kjeld Jensen**
jkjensen@olivant.fo
Náttúrufrøðingur
Heiðursdoktari á
Fróðskaparsetri Føroya



**Flemming Thorning-Lund**
ftl@mail.dk
Náttúruvegleiðari
Fyriskipari av
náttúrunámsferðum

# Snøgg skøra

## – eitt afturí-afturkomið slag í Føroyum

**Snøgg skøra** *Alchemilla glabra*

Á sumri 1987 var Flemming Thorning-Lund á plantufrøðiligari ferð til Føroya, og 23. juli fann Flemming snøgga skøru (mynd 1) í trimum støðum í nánd av Lærarskúlanum á Frælsinum í Havn.

Flemming kannaði skørurnar saman við Jóhannesi Jóhansen (Føroya Náttúrugripasavn), og eingin ivi var um, at talan var um snøgga skøru, og harvið var eitt nýtt plantuslag at innlima í føroysku floruna. Óvist av hvørjari orsøk er snøgg skøra tó ikki nevnd í bókini 'Føroysk flora' frá 2000.

Tá vit í 2020 fóru undir at skriva greinina 'Supplement to Faroe Islands botanical list with 64 species or subspecies including rare, new and potentially

!

Føroysk flora (2000) nevnir hesar skørurnar: **mikilskøru,** *Alchemilla alpina* – **sjeyskøru,** *Alchemilla filicaulis* subsp. *filicaulis* og subsp. *A. f. vestita* – hesi bæði undirsløgini verða í dag einans mett at vera frábrigdi (var.) av *A. filicaulis* – **f**øroyaskøru, *Alchemilla faeroënsis* var. *pumila* og **hvasstenta skøru**, *Alchemilla wichurae.*
Síðan Føroysk Flora kom út, er **garðaskøra**, *Alchemilla mollis,* vorðin partur av føroysku floruni.

invasive species with comments', leitaðu vit dúgliga eftir slagnum, har tað í sínari tíð var funnið í nánd av Læraraskúlanum á Frælsinum í Havn.

Tíverri eydnaðist ikki at finna slagið aftur í tí økinum. Og myndir av plantunum og turkað eintøk, sum vóru prógv um fyrikomingina, vóru farin fyri skeytið onkuntíð síðan 1987.

35 ár gingu, áðrenn snøgg skøra aftur varð funnin í Føroyum. 31. august 2022 fann Flemming fleiri plantur av snøggari skøru (Mynd 2) á einum avmarkaðum øki í Hoyvík, sum annars var merkt av sera fjølbroyttum hagavøkstri.

Gróðurin í økinum er merktur av einum vátum, gróðrarmiklum botni við eyri og gróti í ymiskum støddum. Vakstrarstaðið hevur ymisk fjølbroytt plantusamfeløg hvørt um annað. Her kunnu nevnast: vanligur heiðalyngur og gras- og urtarík samfeløg við rísnum hvassagrasi, reyðvingli, angaroykgrasi og teimum trimum størasløgunum graskendari stør, følnari stør og smástør. Harafturat eru sløg sum: børkumura, eygnagras, blákolla, og smærri øki við t.d. ekstum blóðkampi, beinbrotskattarklógv og tjaldursbørkubónda. Snøgg skøra sløðist ymsastaðni í lýsta økinum.

Tá vit, sum skrivað hava hesa grein, vitjaðu økið aftur í ár, hevði Tórshavnar kommuna herjað økið við stórum gravimaskinum, men til alla lukku var líkt til, at umleið ein triðingur hevði yvirlivað kommunala ágangin.

Fáar dagar seinni fann Dánial Jespersen ein annan lívsterkan stovn av snøggari skøru umleið 1 km. frá tí fyrra. Nú, vit kenna slagið úr økinum í Hoyvík, er sannlíkt, at vit fara at finna tað aðrastaðni, har vit higartil ikki hava gáað um tað, ella hon er komin í bland við hinar skørurnar, sjeyskøru og garðaskøru, sum í støðum eru at finna undir liðini á snøggari skøru í økinum í Hoyvík.

Eitt týdningarmikið eyðkenni fyri snøgga skøru á heysti er týðiliga broytingin frá grønum til sera vøkru gulu og gyltbrúnu litirnar, sum bløðini hava seint á árinum (Mynd 3).

Tá snøgg skøra veksur í føðsluríkari mold, gerst



*Mynd 2. Snøgg skøra í sínum natúrliga vakstrarstaði – einum fjølbroyttum ljósum og vátum lendi.*

hon eins stór og garðaskøra, men garðaskøran hevur ljósari gulgrøn bløð og er loðin á báðum síðum við stuttum, tøttum hárum (Mynd 4).

Um tú nertir við eitt blað av garðaskøru, eigur tú ikki at ivast í, at hetta ikki er snøgg skøra. Bløðini á snøggari skøru eru hárleys á báðum síðum, men hon hevur tó nøkur fá hár á blaðæðrunum á undirsíðuni (Mynd 5).

!

Vit hava valt at nýta heitið 'snøgg skøra' fyri nýggju skøruna, lutvíst tí at tað lýsir sløttu útsjóndina á bløðum og stelkum, og lutvíst tí at tað samsvarar við heitini í hinum norðurlandamálunum. Á donskum er heitið 'glat løvefod', á norskum 'glattmarikåpe', á svenskum 'glatt daggkåpa', á íslendskum 'brekkumaríustakkur' og á enskum 'Smooth Lady's Mantle'.

Snøgg skøra man vera sjáldsamasta skøran í Føroyum. Slagið er sjáldsamt og reyðlistað í Noregi, men rættiliga vanligt í stórum parti av Danmark. ►



*Mynd 3. Snøgg skøra í Hoyvík 4. september 2022.*

Í 'Føroyskari floru' s. 186-189 ber til at lesa um aðrar føroyskar skørur. Leinki til 'Føroyska floru' á Google books: *https://books.google.dk/books?printsec=frontcover&id=bzvKfcUfVeEC#v=onepage&q&f=false*



*Mynd 4. Undirsíðan á lodna blaðnum á garðaskøru.*



*Mynd 5. Undirsíðan á hárleysa blaðnum á snøggari skøru við einstøkum stuttum hárum á blaðæðrunum.*

Eitt sindur um, hvar snøgg skøra veksur, útsjónd og lívfrøði, og hvussu slagið fjølgast.

***Vakstrarstøð:*** Í Noregi og Danmark veksur snøgg skøra natúrliga í nógvum ljósi ella løttum skugga, har moldin er vát og rættiliga føðslurík í lundum, í vegjaðarum, fram við áum, í kavafonnum (í Noregi) og í opnum skógum.

Útsjónd**:** Slagið gerst vanliga 30-50 cm høgt. Snøgg skøra er eitt sindur loðin niðast á stelkunum. Ovari partur á stelkum og blómustelkum og undirsíðan á blómubikarinum eru hárleys ella nærum hárleys.

***Fjølgan:*** Eins og øll skørusløg fjølgast snøgg skøra lutvíst við fræum, sum ikki krevja dusting (apomiksis) – lutvíst við vøkstri, har plantan gerst størri.

Ættin skøra er ein grein av ættini *Rosaceae* og hevur í Noregi 27 sløg, sum hava lagað seg til sera ymisk vakstrarviðurskifti. Í Danmark kenna tey 12 sløg, og hildið verður, at 8 av sløgunum eru upprunadonsk. Í Íslandi finst snøgg skøra einans í býunum, og hetta bendir á, at hon er innslødd.

***Kunnleiki um útbreiðslu av skøru:*** Áhugavert hevði verið at frætt frá lesarum, sum finna hetta vakra skøruslagið.

**Takk:** Dánial Jespersen, fyri fráboðanina um tað seinna vakstrarstaðið í Hoyvík.

## Keldur:

Flóra Íslands – Blómplöntur 2023. http://www.floraislands.is/alchegla.html

Hartvig, Per og Vestergaard, Peter 2015. Atlas Flora Danica. Dansk Botanisk forening. Rosaceae (Alchemilla). Pp. 288-294.

Jensen, Jens-Kjeld, Thorning-Lund, Flemming and Hammer, Sjúrður 2023. Supplement to Faroe Islands botanical list with 64 species or subspecies. Pp. 1-13.

Jóhansen, J. 2000. – In: Fosaa, A. M., Rasmussen, S. (eds). Føroysk flora. Føroya Skúlabókagrunnur, Pp. 1-485.

Norsk rødliste for 2021. Alchemilla glabra – Rødliste 2021 – Artsdatabanken. https://artsdatabanken.no/lister/rodlisteforarter/2021/14116

Store norske leksikon 2023. https://snl.no/.search?query=Marik%C3%A5pe

# Føroyska náttúran slítist
# – hvat kunnu vit gera?

*Trýstið á føroysku náttúruna er stórt. Náttúrukreftirnar, sum slíta, kenna vit væl: regn, vindur, omanlop, brim o.a. Oman á hesar náttúrukreftir koma vit menniskju, tá vit brúka náttúruna á ein hátt, sum skundar undir slitið.*

Nógv sár og ofta stórir skaðar eru at síggja í lendinum, sum fólk hava elvt til. Vit síggja m.a. niðurbitin øki orsakað av ikki-burðardyggum seyðahaldi, spor eftir harðligari ferðslu við 4-hjólarum, greflig og ofta illa frágingin sár frá samfelagsútbyggingini seinastu øldina, illa frágingin lendi frá torvskurði og niðurslitnar rásir orsakað av nógvu føroysku og útlendsku ferðafólkunum.

Um okkara náttúrufatan ikki mennist, og nýtslan av náttúruni, m.a. til seyðahald, ikki verður umhvørvisvinarligari, verða trupulleikarnir við jarðrivi, lendisspelli og minkandi lívfrøðiligum margfeldi í høgunum bara størri, sum tíðin gongur. Hetta, at vit fara so illa um náttúruna, fer ikki at gera trivnaðin í landinum størri og fer at ávirka menningarmøguleikarnar av okkara samfelag.

## Bóklingur „At lesa landið“

Í 2007 kom út bóklingur við føroyska heitinum „At lesa landið“. Bóklingurin var úrslitið av arbeiði hjá norðurlendskum arbeiðsbólki við luttakarum úr Finnlandi, Svøríki, Norra, Grønlandi, Íslandi og Føroyum. Arbeiðið bygdi á royndir og vitan úr norðurlondum, hvussu vit lesa heilsustøðuna í náttúruni fyri at vita, um lendisnýtslan er burðardygg. Bóklingurin kom út á fimm málum: grønlendskum, føroyskum, samiskum, finskum og donskum og var ætlaður bóndum og brúkarum av óveltum lendi.

Bóklingurin lýsti hugtakið lendisspell (á enskum nevnt *landdegradation*), sum hendir, tá náttúran viknar orsakað av øktum trýsti. Lendisspell er sostatt ein tilgongd í nógvum stigum, sum er avleiðing av øktum trýsti á eitt øki, bæði orsakað av natúrligum broytingum ella orsakað av, hvussu vit nýta lendið.

Lendisspell byrjar ofta spakuliga við, at plantusamansetingin broytist. Tær plantur, sum ikki tola trýstið, hvørva, og í staðin sæst meir til plantusløg, sum tola økta trýstið. Sleppur trýstið á náttúruna at halda fram, fara vit at síggja berar blettir við færri plantum. Her kann regn og vindur fáa fatur í leysa jørðildinum og føra tað burtur. Síðsta stigið í lendisspellinum er, tá eitt øki er lagt í oyði og er vorðið til oyðimørk, har mestsum ongar plantur síggjast. Leysa jørðildið er burtur, og eftir sæst ber hella og skónir av smásteinum og grúsi.

Ofta er lendisspell ein tilgongd, sum hendir so spakuliga, at fólk gerast von við tilgongdina. Í fleiri londum verður tí tosað um „land literacy“ og „geo literacy“ – nevniliga hetta hugtakið „at lesa landið“. Hvussu kunnu vit menna førleikan at lesa landið við at eygleiða tekin um heilsustøðuna í náttúruni? Hvørji tekin skulu vit leggja merki til fyri at eygleiða broytingar, sum eru í ferð við at henda? Hvussu kann henda vitan vera við til at minka um lendisspell, sum hendir orsakað av skeivari lendisnýtslu?

Grøn graslendi, sum vit síggja uttangarðs nógvastaðni í Føroyum, eru lagað til trýstið, sum kemur av seyðabiti. Her vaksa grøs og aðrar plantur, sum klára seg í einum umhvørvi við nógvum biti. Hesin vøllur hevur sostatt eitt plantufrøðiligt margfeldi, sum er broytt orsakað av høgum trýsti á náttúruna. Vit hugsa sjáldan um, at hetta er eitt stig á leiðini til byrjandi lendisspell við broyting í upprunaliga vøkstrinum.

Á næsta stignum við lendisspelli er gróðurin broyttur til plantusløg, sum tola høgt hagabit. Við tíðini síggjast berir blettir við ongum gróðri. ▶



**Lis Mortensen**
lis.mortensen@jardfeingi.fo
landafrøðingur
Jarðfeingi



**Gunnar Bjarnason**
gb@bg.fo
landbúnaðarfrøðingur
Búnaðargrunnurin



*Skriðulop í Kalsoynni*

Tá hesi beru økini byrja at síggjast í lendinum, kann broytingin fara fleiri vegir.

Annar møguleikin er, at gróður tekur yvir, sum tolir tað høga trýstið, sum er, ella sum gagnast illa hjá djórunum. Í slíkum føri kann mosi taka yvir. Mosin gagnast illa hjá djórunum, sum ganga á biti her.

Hin møguleikin er, at teir beru blettirnir gerast størri, og við tíðini verður økið rakt av altumfevnandi erosión. Tá tað er komið her til, kann verða torført at venda gongdini, tí leysa jørðildið hvørvur, og vandin fyri frostskaða økist.

Hvønn vetur setur frostur í hesi lendi og forðar nýggjum vøkstri at koma inn á økið og trívast.

Vatn máar enn meir burturav, moldin hvørvur við vatni og vindi. Tá eru vit komin til oyðimarkargerð.

Í slíkum økjum er leysa jørðildið ofta soleiðis samansett, at frost fær fastatøkur. Tilfarið verður flutt av frosti og frostsorterað. Har, ið slætt er, verða steinar og mold frostsorterað í rund mynstur, nevnd keppavond á føroyskum (Polygonal ground á enskum). Har, sum lendið hellir eitt sindur, verða smásteinar og eyrur sorterað í strípur, og vit síggja strípujørð.

Tilgongdin at sortera jørðina á henda hátt hendir um veturin, tá ovastu millimetrarnir av fínum tilfari verða lyftir upp av frostnálum, sum kunnu gerast nógvar sentimetrar langar.

Tá ið frostið er horvið, liggja teknini um tað framvegis í tí bera jørðildinum. Vit síggja, hvussu tað fína leysa tilfarið liggur at kalla sum lættir breyðmolar, sum lættliga fúka við vindi ella flytast við vatni.

## Veðurlagið í Føroyum

Føroyar eru fjallaland, og veðurlagið kólnar, jú hægri upp vit fara.

Miðalhitin nær sjóvarmálanum er góð 11°C í juli og august. Veðurlagið her verður nevnt tempererað veðurlag.




*At lesa landið. Bóklingur frá 2007 á fimm málum.*

Hitalagið kólnar umleið 0,7°C fyri hvørjar 100 metrar. Tað merkir, at minni enn 200 metrar yvir havinum er miðalhitin um summarið vorðin kaldari enn 10°C. Tá ið hetta hendir, fara vit frá tempereraða veðurlagnum til arktiskt veðurlag, sum í veðurlagsklassifikatiónsskipanini hjá Köppen–Geiger verður nevnt ET, Polar Tundra.

Vit síggja, at umleið 70 % av føroyska landslagnum liggur í arktisku sonuni, sum sambært Köppen–Geiger-veðurlagsskipanini hevur arktiskt veðurlag. Her er miðalhitin í teimum heitastu mánaðunum lægri enn 10°C.

Tað, sum eyðkennir hesi økini, er kaldari veður. Her er meira avfall, og vindurin er harðari. Tað frystir meir, og lendið kann verða merkt av óstøðugleika orsakað av frosti. Plantusløgini, sum vaksa her, hava størri avbjóðingar, vaksa spakuliga og tola tí illa bit. Um økini gerast ber, er vandin størri fyri, at moldin verður borin burtur av vindi og vatni og hvørvur.



*Ovara myndin: Keppavond. Niðara myndin: Strípuvond*




Hetta merkir, at økini uppi í hæddini eru undir øktum sliti orsakað av natúrligum tilgongdum og tí eru meira viðbrekin fyri sliti, sum kemur vegna bit. Gróðurin má laga seg til tað kaldliga umhvørvið. Her regnar og kavar munandi meir, vindurin er harðari, frostið bítur ikki bara í klett og hellu, men eisini í leysa jørðildið í beru økjunum við svarðloysi.

Alt tað føroyska landslagið er merkt av lendisspelli á ymiskum stigum, og hetta vísir okkum, at stórir partar av høgunum tola illa bit.

Samanumtikið mugu vit helst staðfesta, at stórur partur av teimum ovaru lendunum tola illa bit, og at seyðahaldið í Føroyum ongantíð hevur verið burðardygt.

## Hvat kunnu vit gera við hetta?

Eitt tað mest umráðandi er, at vit gerast før fyri at fylgja við, hvat hendir. Tað er alneyðugt at gera langtíðarmátingar í føroysku náttúruni, sum ►





Fólk ganga í Tindhólmi

Undir Slættaratindi

kunnu skapa haldgóða vitan um heilsustøðuna í náttúruni. Við hesi vitan ber til at læra, hvussu burðardygt brúk av høgunum kann skipast, so vit kunnu minka slitið í føroysku høgunum, sum kemur orsakað av skeivum brúki.

Tað ber væl til at samstarva og læra av grannalondum okkara. Tað er tó umráðandi ikki at hvíla á donskum ella norskum tilfari. Náttúran í Føroyum er á nógvum økjum ikki tann sama. Tað er týdningarmikið at skapa vitan, sum er viðkomandi fyri júst hetta landið.

Tí er tað umráðandi við eini ráðstevnu sum hesari: Náttúrusýn í Føroyum. Vit mugu tosa saman um okkara fatan av tí føroysku náttúruni á ein hátt, so nýggj vitan kemur út millum fólk. Herviða kunnu vit menna føroysku náttúrufatanina og menna okkara førleika at lesa føroysku náttúruna.

Tørvur er á at menna okkara nýtslu av lendinum, so hon verður burðardyggari og náttúruvinaligari. Vit mugu læra okkum at lesa landið og á ein burðardyggan hátt taka við teimum avbjóðingunum, sum eru fyri framman.



Útferð í Vatnsdali

# Framtíðin er í náttúrunnar *fjølbroytni*

*Føroyska ferðavinnan hevur gjørt eitt megnar arbeiði at lýsa Føroyar fyri umheiminum. „Untouched“, „unspoiled“ og „unbelievable“ eru væl kend hugtøk, sum verða nýtt í lýsingum um ferðamálið Føroyar, eftir at ein kapping fór í gongd hjá Visit Faroe Islands, har ferðafólk, sum høvdu vitjað Føroyar, fingu høvi at geva landinum nøkur sereyðkenni. Orðini, sum oftast gingu aftur, vóru hesi trý, og tykjast hesi sum heild at vera ein fatan, sum nógv, ikki bert ferðafólk, men eisini føroyingar hava um okkara fjarskotnu oyggjar.*




**Kolbrún í Haraldsstovu**
kolbrun@savn.fo
Savnsvørður á Plantudeildini, Tjóðsavnið


Tað er lætt at skilja, hví fólk eru hugtikin av okkara vakra landi. Brøtt berg, grønir dalar og fjøll, so langt eygað sær, og sum við harðbalna veðurlagnum setur ein heilt serligan dám á okkara ofta mjørkaklæddu og gátuføru landsløg. Men hesi trý hugtøkini ella hendan fatanin av føroysku náttúruni kann eisini vera við til at venda blinda eygað til tað náttúruslit, sum árliga gerst meira umfatandi orsakað av veðurlagsbroytingum og øðrum menniskjaligum virksemi.

## Shifting Baseline Syndrome

*Shifting Baseline Syndrome* (SBS) er eitt vísindaligt hugtak, sum lýsir, hvussu tað góðkenda markið hjá fólki viðvíkjandi heilsustøðu náttúrunnar ella náttúrusliti áhaldandi flytist. Tað merkir, at væntanir, sum fólk vanliga hava um náttúruøki (t.v.s. øki, sum eru verd at verja), minka, og tollyndi fyri beinleiðis náttúruoyðing hækkar. Av tí at royndir og vitan við tíðini hvørva, fara nýggju ættarliðini at góðtaka náttúrustøðuna, sum hon er, sum vanliga, tí tað er tann støðan, tey kenna til og eru uppvaksin í. SBS er viðurkent sum ein av grundleggjandi forðingunum fyri, at fleiri náttúru- og umhvørvistrupulleikar verða umrøddir.

## Støðan í Føroyum

Føroyingar hava í øldir gagnnýtt náttúruna. Vit hava sett búgv, skorið torv, latið seyðin ganga frítt í haganum, velt, fiskað og veitt fugl í hópatali. Enn í dag eru okkara størstu vinnur beinleiðis tongdar at okkara náttúrutilfeingi. Mann kann tí kanska siga, at føroyingar av tí sama hava mett, at eitt landslag hevur havt størri týdning enn hini. Vátlendi eru avveitt og velt, lyngheiðar, strendur og fjøra eru í stórari minking, sum hevur havt við sær, at graslendi nú eru ráðandi í føroysku náttúruni. Tí er landslagsfjølbroytni í Føroyum minkað við tíðini, ella tað, sum eisini verður kallað lívøki ella habitat, helst vorðin færri í dag. Plantu- og djórasløg, sum ikki trívast í graslendi, hvørva tí úr føroysku náttúruni.

Náttúran var sera fjølbroytt, áðrenn fólk komu til Føroya. Tað vísa kanningar av forntíðargróðri. Menniskju komu higar fyri umleið 1700 árum síðan og høvdu tá seyðin við sær, sum legðist á ríka gróðurin. Við tíðini broyttist føroyska landslagið, gróðurin, sum var vanligur í haganum, hvarv og er í dag bert at síggja í gjáum og homrum, har seyður ikki sleppur framat.

▶



Á Víkum. Kolbrún í Haraldsstovu hevur tikið allar myndirnar til hesa greinina.

Men tó halda flestu føroyingar enn, at einsháttaða graslendið er tað, sum eyðkennir føroysku náttúruna. Nógv kenna ikki til tann gróður ella tey náttúruøki, sum fyrr vóru vanligari. Tað er torført at vita, hvat vit hava mist av fjølbroytni gjøgnum tíðirnar, tá vit ikki seta spurnartekin við tað, sum er, ella kenna til tað, sum var. Vátlendi eru enn sædd sum ein plága fyri bøndurnar, og inntriv frá bygging og vegakervi henda, uttan at spurnartekin verður sett við, hvussu tað verður gjørt, ella hvørjar avleiðingar tað hevur á náttúruna. Skriðurnar í fjøllunum eru vorðnar so mikið vanligar, at hildið verður, at tær leypa av natúrligum ávum. Náttúrufatanin hjá føroyingum kann tí eisini sigast at vera í støðugari broyting.

## Fjølbroytni stendst av margfeldi

Í lívfrøðiligum høpi verður fjølbroytni eisini nevnt lívfrøðiligt margfeldi. Í Føroya náttúru (2000) verður lívmargfeldi skilgreinað soleiðis: „Lívfrøðiligt margfeldið er fjølbroytni viðvíkjandi livandi verum í øllum umhvørvinum, á landi, í vøtnum, í áum og í sjónum, og tað vistfrøðiliga samspælið, tær eru partur av.“

Lívfrøðiligt margfeldi umfatar fjølbroytni á trimum stigum: ílegustig, slagstig og vistskipanarstig. Øll stigini virka í samljóði við hvørt annað. Lækkar eitt nú tað genetiska fjølbroytnið, kann tað minka um tillagingarmøguleikar hjá djóra- ella plantusløgum í náttúruni. Fjølbroytni er eisini týdningarmikið millum sløg: fleiri plantusløg geva fleiri skordýrasløg, sum geva fleiri fuglasløg o.s.fr. Stigini hanga saman.

Ein vistskipan er ein avmarkað eind, men ein samvirkandi heild. Ein vistskipan hevur virksemi í fleiri liðum, orka verður flutt runt, oftast við gróðrinum. Djór eta plantur, sum so aftur eru føði hjá øðrum djórum. Tí hevur oyðing av einum slagi negativa ávirkan á onnur sløg í eini vistskipan. T.d. tað at blómuflugur eru í minking, ávirkar nøringina hjá nógvum plantusløgum. Ella tá fjølbroytni í havinum minkar, kann føðigrundarlagið hjá sjófuglastovnum versna. Nógvar vistskipanir eru sera ávirkaðar av menniskjum, og aðrar eru í skjótari broyting.

Menniskju hava ment seg saman við vistskipanum á jørðini og eru tí tongd at hesum skipanum og teirra íbúgvum fyri at yvirliva. Vistskipanir reinsa luftina og vatnið, aveitra og niðurbróta rusk, minka um avleiðingar av hørðum veðurlagi og vatnflóð. Lívverurnar í vistskipanum dusta plantur og avgrøði okkara, hava tamarhald á farsóttum, uppbyggja og varðveita moldina. Kanningar vísa, at vistskipanir og teirra førleikar at veita tænastur eru knýttar at fjølbroytni. Soleiðis sum okkara menniskjaliga virksemi áhaldandi minkar um lívmargfeldið, minka vit sostatt um førleikan hjá vistskipanum at fremja tær tilgongdir, sum eru grundarlagið undir okkara egnu tilveru.



*Hamari á Syðradali í Kalsoynni*

## Mótstøðuføri stendst av fjølbroytni

Týdningurin av fjølbroytni er allastaðni at finna. Ald plantusløg, sum til dømis verða nýtt til matna, eru upprunaliga frá villum sløgum, sum kunnu vera útdeyð í náttúruni. Mótstøðuførir arvaeginleikar ímóti ávísum sjúkum verða funnir í villum plantusløgum og eru við til at bjarga milliónum av fólki. So við og við verður uppdagað, at mótstøðuføri liggur í fjølbroytni. Ikki bert á einum ílegustigi, men eisini á slag- og vistskipanarstigi, tí liðini í vistskipanini eru tongd hvørt at øðrum. Men tá sløg verða ald til okkara fyrimunar, verða eginleikar ▶

Vátlendi í Kaldbak



Innkomuvegurin í Hoyvík



eisini valdir og vrakaðir í tilgongdini. Eginleikar hvørva, sum høvdu ein týdning, vit kanska ikki vistu um. Tískil minkar fjølbroytnið, og sløg eru meira hótt av sjúkum og náttúrubroytingum sum heild.

## Plantuliga fjølbroytnið í Føroyum

Gróðurin í føroysku náttúruni hevur sín uppruna ymsastaðni. Menniskju tóku plantur við sær, tá tey komu higar, og onnur plantusløg eru komin við fugli, vindi og sjógvi. Men tað hevur verið ein tung ferð hjá flestu plantum at finna fram til hesar fjarskotnu oyggjar. Tær plantur, sum hava klárað ferðina, hava síðani tillagað seg til serstøku náttúruna og veðurlagið við tíðini og vaksa tí allarbest í føroysku náttúruni. Men hetta kann eisini merkja, at tann gróður, sum trívist her, hevur eitt lágt ílegufjølbroytni. Tað ger plantusløgini minni mótstøðufør enn tey á meginlandinum rundan um okkum. Tí kanningar vísa, at størri fjølbroytnið er, sterkari stendur eitt slag, ein stovnur ella ein vistskipan seg ímóti broytingum. Serliga teimum broytingum, sum hava nógva ferð, so sum veðurlagsbroytingar.

Enn eru ongar reglugerðir, sum forða fyri innflytingi av útlendskum plantusløgum. Útlendskt fræ verður stroytt út í hagan, og innræsin plantusløg spjaðast óavmarkað út um bøgarðarnar. Tá útlendskur gróður fær festi, kann upprunaligur gróður verða skumpaður burtur av innanhýsis kapping millum plantusløg, og fjølbroytnið í haganum minkar. Samstundis ávirkar seyðabit gróðurin. Tað hóttir gróðurin og leggur enn størri trýst á lendið. Nógv eru menniskjaligu inntrivini, ið ikki taka atlit til

*Innkomuvegurin í Hoyvík*



náttúruna, og tí kann hugsast, at gróðurin í Føroyum er viðbrekin, tí torført er hjá náttúruni at fylgja við teimum skjótu broytingunum og at tillaga seg samsvarandi.

## Framtíðin er í náttúrunnar fjølbroytni

Skulu Føroyar koma nøkulunda óskalaðar ígjøgnum veðurlagskreppuna, má fjølbroytni raðfestast. Tann vanliga náttúrufatanin má víðkast, og ásannast má, at ymisk landsløg hava týdning. Fjølbroytt uppruna náttúra má verjast, og fjølbroytni má fáast inn aftur í býin og urtagarðarnar. Eitt lítið stig, sum kann gera stóran mun fyri lívmargfeldið í Føroyum, er at fara frá grønum einsháttaðum grasvøllum til villar føroyskar urtagarðar.

Tá náttúra er oyðiløgd, ber illa til at fáa hana aftur í sína uppruna legu. Hetta er tí, at náttúran í síni heild er samansett av elligomlum vistskipanum, sum í túsundtals ár hevur uppbygt sítt serstaka fjølbroytni. Nógv lond rundan um okkum hava ásannað týdningin av fjølbroytni ov seint. Tí, hóast stórar upphæddir eru brúktar til at endurskapa náttúru, fæst einans ein ímynd aftur av tí náttúru, sum var. Vit kunnu læra av mistøkunum hjá okkara grannalondum. Vit hava enn øki við órørdari náttúru og hava møguleika fyri at verja tey og soleiðis varðveita lívmargfeldið ella fjølbroytnið, sum bert er at finna í upprunaligari náttúru. Læra vit um og kanna føroysku náttúruna, skilja vit betur, hvussu náttúran er fyri. Hvørji landsløg, plantu- og djórasløg eru, og hvussu tey trívast. Tá gerst lættari at fyrireika seg til eina ófrættakenda framtíð, merkta av veðurlagsbroytingum, og at tálma avleiðingarnar, sum standast av hesum broytingum.



*Skógfriðaða økið við Kirkjubø*



*Løgasteinar í Leynum. Mynd: Natmus*

# Grót í fýra yrkingum
# *frá teimum seinastu hundrað árunum*

*Eg fari at hyggja at fýra føroyskum yrkingum, sum spenna um á leið eina øld, frá 1920-árunum til 2017, og sum allar hava grót í miðdepli. Hvat umboðar grót í hesum yrkingum, og hvat tað sigur okkum um tíðina, tær vórðu til í?*



**Turið Sigurðardóttir**
turids@setur.fo
professari emeritus
Fróðskaparsetur Føroya

### „Grótið í Føroyum"

Tað fyrsta dømið er ein ungdómsyrking eftir Sigurð Joensen (1911-1993) frá 1920-árunum, „Grótið í Føroyum." Fyrra helvt av yrkingini umrøður grót, hetta høvuðseyðkenni Føroya, sum ikki ber til at velta og saksa, og sum tí fruktir og annað gott, sum veksur uttanlands, ikki kann vaksa í. Sanniliga, plantur vaksa ikki so væl í gróti sum í tí landi, ið er bygt upp av „ler, sand og grus", sum skemtandi verður tikið til við tilsiping til landalærubók í barnaskúlanum.

Síðan vendir yrkingin umrøðuna til, hvat hetta haldgóða slagið, sum er allastaðni í Føroyum, *er* nýtiligt til:

Íhvar tú um Føroyar enn hyggur,
tú sært hetta haldgóða slag.
Tað niðast í fjøruni liggur,
á ovastu knúkum er tað.

Tað ber til at skjóta tað og nýta til hús, brýr, garðar og vegir, og yrkjarin spáar:

Vit mikið við grótið nú gera,
og meira vit nýta tað brátt,
tí allir vit einigir verða
at grótið er nyttugt og gott.

Samanburðurin millum tey lond, har tað veksur so væl, og grýtutu Føroyar endar við føroyskum fyrimuni:

Koyr vekk við tí landi, sum ikki
er uppbygt við gróti til grund;

Yrkingin leggur doyðin á at síggja møguleikar heldur enn vansar og forðingar og ger tað út frá nyttusjónarhorni. Hon hýsir hugmyndini, idéini, um menning og vøkstur, og vísir á grótið sum eitt framúr tilfeingi, sum í framtíðini fer at verða enn meira brúkt. Hon fekk rætt í tí, hóast hon ikki sá fyri sær tunlar yvir og undir sjónum. ▶

*Grótbrúgvin um ánna í Funningi er laðað fyrst í 1900. Mynd: Sjúrður Skaale*





Brim við Bøsdalafoss.
Mynd: Andreas Mouritsen
– Myndabókin „Á flogi“

## „Skjólveggur“

Tann næsta yrkingin,“Skjólveggurin“ eftir Christian Matras (1900-1988), er frá 1933.

„Skjólveggurin“ er bergið, sum verjir landið móti ágangi frá náttúrukreftunum. Yrkingin lýsir, hvussu havið smátt um smátt vinnur á berginum. Spurningurin er ikki, hvussu menniskju kunnu nýta grótið, men um oyðandi náttúrukreftir. Tíðarsjónarringurin er jarðsøguligur, ikki máldur við alin menniskjalívsins:

Klettakloddut og skerjut er nú landsins verndarberg.
Súgur og sleikjandi flóð og brim
máa gamalt grót.

Yrkingin hevur ikki endarím, men, sum vit hoyra, stavrím, og vendingin „gamalt grót“ hevur í sær bergmál av gomlum máliskum. Reglurnar, ymiskar í longd, minna á eitt berg, sum máað er undan, og sum stendur til at leypa.

Yrkingin sær bara oyðingina. Hóast yrkingin ikki beinleiðis hevur menniskjaligt sjónarhorn, so hevur hon tað óbeinleiðis í orðunum: „…múrur mót havi settur“ og „… landsins verndarberg“ – tí hesi orðini rúma lívi, mannalívi og øðrum lívi, sum bergið eigur at verja, men ikki altíð fer at megna at verja. Sjónarhornið er broytt, síðan yrkingin varð til: tann jarðsøguliga frásjónin í hóttanini frá náttúrukreftunum er ikki longur sædd í jarðsøguligari frásjón, tí í dag er hóttanin komin nærri.

Tey ymisku grótheitini í yrkingini umboða teir ymisku formarnar hjá gróti ávegis móti oyðingini – *veggur, nev, ben, hamrar, møl, steinur, múrur, sker, drangar* – frá bergi til møl og sker.

Yrkjarin og málfrøðingurin Chr. Matras hevði 3 ár frammanundan, í 1929, givið út føroyska orðabók, sum m.a. skuldi varðveita hesi grót-orðini, meðan veður og vindur máaðu tað, sum orðini standa fyri, burtur.

## „Klettur“

Tann triðja yrkingin er „Klettur“ frá 1960 eftir Karsten Hoydal (1912-1990). Hetta er hvørki ein bjartskygd yrking um alt, sum grót er nýtiligt til, ella ein svartskygd yrking um, at harðasta grót máast burtur.

Í hesi yrking vendir yrkingar-eg’ið sær til klettin og ber sína egnu gátuføru tilveru saman við søguna hjá klettinum alt frá tí, hann varð slongdur glóðheitur úr jarðarinnar innvøli, til hann nú stendur fyri eygunum á tí talandi eg’inum. Fyri honum er kletturin ein einstaklingur við sál. Tøgn steinsins kallar fram talu hansara; hann kennir seg skyldan við klettin og veit, „At eisini í tær bragdar lív og langtan,/ at eisini tú ert á ferð og við í fylgi, / broytist og skapast líðandi um/ til tigandi dust, sum er mold, livandi dust, sum er mold.“ Yrkjarin sigur, at orðini „steintigandi“ og „steindeyður“ ræða hann ikki, hann tekur tey ikki fyri áljóðandi, men tulkar steinin sum part av ringrás lívsins, har alt er til í broyting. Tað er ikki dapurt, at kletturin máast, tað er ein partur av ringrásini, sum yrkingar-eg’ið og kletturin taka lut í, hvør á sín hátt, kletturin í jarðsøguligum sjónarhorni, yrkingar-eg’ið í mannalívssjónarhorni. Til samans mynda teir eitt kosmiskt sjónarhorn, har alheimurin er ein heild.



*„Íbygdur“ steinur á Selatraðarvegnum.*
*Mynd: Símun Mittún*

## „Trappusteinurin“

Tann yngsti yrkjarin, sum yrkir um grót, er kanska Tóroddur Poulsen (f. 1957). Yrkingin „Trappusteinurin“ er frá 2017. Í henni knýtir yrkjarin saman mannalívið og grótið, sum í ávísan mun verður lýst sum ein vera við kenslum. Ein trappusteinur myndar mark millum heima og ikki-heima, markar inngongd og útgongd; yrkingin knýtir síðan trappusteinin at gravsteininum, sum er skotin úr „sama sári“. At kletturin fær „sár“, tá ið eitt petti verður skotið úr honum, ger hann í ávísan mun til eina livandi veru, sum kann særast. Í yrkingini hjá Christiani Matras stendur, at „bergið sortnar í gomlum beni“, t.e. gomlum sári. – Munurin er, at hjá Christiani Matras stavar sárið frá natúrligum omanlopi, men hjá Tóroddi er tað av mannaávum.

Yrkingin hjá Tóroddi slær fast, at trappusteinurin er nær skyldur við gravsteinin – báðir eru úr sama bergi brotnir ella skotnir, og her kemur undirtekstur upp í leikin, sum minnir á ættarbondini, men eisini á „gamalt grót“ í yrkingini hjá Christiani Matras og „gamalt føroyskt grót“ í yrking hjá Jóannesi Patursson. – Tóroddur tvinnar grótið saman við lívshátt og mentan: trappusteinurin, sum vit ganga um gjøgnum lívið, og gravsteinurin, sum tey eftirlivandi seta, eru av sama bergi. Boðskapurin er skyldur við tann kosmiska boðskapin hjá Karsteni Hoydal. Men hjá Tóroddi er grótið lýst í sambandi við menniskjaligt virksemi og mentan. Í yrkingunum hjá Christiani Matras og Karsteni Hoydal er ikki talan um tað. Harafturímóti er grótið í yrkingini hjá Sigurði Joensen sætt úr menniskjaligum nyttusjónarhorni burturav, og hon er tí ikki heilt óskyld við yrkingina hjá Tóroddi.

## Tær fýra grótyrkingarnar í fullum líki

*Sigurð Joensen:*

**Er lítið í Føroyum at fáa**

Er lítið í Føroyum at fáa,
av einum er almikið til.
Eg vil ikki oyggjarnar háða,
men beinleiðis tala eg vil.

Ei Føroyaland mikið kann bjóða
av tí, sum ein uttanlands fær
av fruktum og øllum tí góða,
sum jørðin kann geva av sær.

Íhvar tú um Føroyar enn lítur,
tú sært ikki skógvaksnan teig;
men eitt er, sum Føroyum ei trýtur,
tí grótið tað tvørrar her ei.



*Trappusteinur.*
*Mynd: Natmus*

Íhvar tú um Føroyar enn hyggur,
tú sært hetta haldgóða slag.
Tað niðast í fjøruni liggur,
á ovastu knúkum er tað.

Ei plantur so væl kunnu vaksa
í tí sum í „Ler, Sand og Grus“,
tí grótið ei letur seg saksa,
men skjóta og nýta til hús.

Í brúgvunum grótið vit finna,
í gørðum og vegum tað er,
og ikki mær dámar at spinna,
tá grótið ei tænastu ger.

Vit mikið við grótið nú gera,
og meira vit nýta tað brátt,
tí allir vit einigir verða,
at grótið er nyttugt og gott.

Koyr vekk við tí landi, sum ikki
er uppbygt við gróti til grund;
tað hevur ei føroyingsins tykki
sum hamrar og streymhørðu sund.

Yrkingin stendur í: Sigurð Joensen o.o.: *Eimur í øsku,* s. 34-35. Ungu Føroyar 2019.

– ∗ –

*Chr. Matras:*

**Skjólveggurin**

Út stendur nev í neðra.
Sortnar bergið í gomlum beni.
Hamrar av gráum gróti daga í erva mót lofti. ►

Malarblámi við klettin.
Hvítnar hitt kalda havið
inni við dimman stein.

Hetta var múrur mót havi settur
og norðanódn.
Rapladu niður urðar úr homrum.
Malargrót legðist á havsins botn.

Morknaði berg í støðum,
losnaði omanlop –
sker og drangar eftir standa sum risagrundir.

Klettakloddut og skerjut er nú landsins verndarberg.
Súgur og sleikjandi flóð og brim
máa gamalt grót.

Yrkingin stendur í: Chr. Matras: *Yrkingar*.
Føroya Lærarafelag, 2004, s. 43.

– ∗ –

*Karsten Hoydal:*
**KLETTUR**
Fagur sum morgunroðin,
bræddur í sjóðandi eldi
slongdist tú út úr jarðarinnar innvøli, -
varmi tín gav loftinum titrandi lív,
í havsins spegili ljómaði koma tín,
so vart tú føst grund undir landi mínum. –
Tá ið brakanin av eldi var av,
vart tú rógv og djúp tøgn.
Tú! Skæri korkagróni klettur!

Um summardimmið eins og ein brúður
leggur tú glæmu uttan um teg,
ljósa og svinna andlit títt
– krýnt av dagsins evstu glæmu –
horvir loyndarfult móti mær,
bindur meg við lívsgátu:
hvaðan komu vit, og hvar ber leiðin?
Komnir av longum veg
hittast vit her um summardimmið. –
Spurin og tigandi starir tú at mær.
Við tøgn tíni vil tunga mín loysast.

Hvat veit eg um meg sjálvan
og um títt læsta andlit,
sum speglast í grótgráa heila mínum?
So tætt hjá mær, at hondin hvílir á tær,
ert tú mær kortini stjørnufjarur,
fjarur sum børn míni, kunningar og næstar,
fjarur sum alt, hugur mín skilir ikki
av mær sjálvum
alt tað káma, sum speglast í tíðarinnar
døkku flóð.

Men kortini føli eg námd tína,
hon er ein gleði í blóði mínum,
bindur okkum tætt tilsamans, -
fundvís leiðir hon okkum í ring
út úr upphavi, inn aftur í upphav.

Longu áðrenn her var mold og gróður,
skolaðu øldirnar fram við tær,
vatnið og vindurin sungu tær kvøður.

Ikki firrist eg tíð og tøgn, rógv og elli,
havi ikki gloymt at lýða á, har tøgn valdar,
orðini steintigandi og steindeyður ræða
meg ikki,
tí eg gruni eina sál í kvirru tíni,
veit, at eisini í tær bragdar lív og langtan,
at eisini tú ert á ferð og við í fylgi,
broytist og skapast líðandi um
til tigandi dust, sum er mold,
livandi dust, sum er mold.

Yrkingin stendur í: Karsten Hoydal: *Vatnið og ljósið*,
s. 38-40. Egið forlag, 1960.

– ∗ –

*Tóroddur Poulsen:*
hesin
trappu-
steinurin
skotin úr
einum sári
er
nær skyldur
við gravsteinin
úr sama sári
sum ber eitt navn
ella bæði tvey
og tey hava
helst eisini
stigið á
trappu-
steinin
ella ein annan
í somu slekt

Yrkingin stendur í: Tóroddur Poulsen: *Ferðamaður í egnum heimi*, s. 61. Sprotin 2017.

# Tað er eitt mark *fyri øllum*

*Tað er eitt mark fyri, hvussu nógv menniskjuni kunnu taka úr náttúruni. Tí hava vit í dag fingið orð og hugtøk sum eitt nú at troyta tilfeingið burðardygt og burðardygg menning. At troyta tilfeingið burðardygt merkir, at nýtslan úr náttúruni hvílir í sjálvum sær ella er á haldgóðum grundarlag. Ein burðardygg menning merkir stutt sagt ein vøkstur, uttan at tað natúrliga tilfeingið versnar fyri komandi ættarlið.*



**Jóan Pauli Joensen**
Professari emeritus, dr. phil & fil. dr
Fróðskaparsetur Føroya
jopajo@setur.fo

Hyggja vit í Bíbliuna, so stendur í fyrstu Mósebók (29-31), at menniskjan fekk alla floru og alla faunu at ráða yvir og brúka sum føði. Tað hava vit menniskju troytt síðani, umframt alt tað, sum eisini er í undirgrundini, og tað, sum tøkniliga menningin hevur gjørt møguligt at nýta.

Tað at troyta tilfeingið er farið fram við støði í tí, sum vit hava nomið sjálv, og í teimum hugmyndum, normum, virðum og tí kunnleika, sum vit hava nomið frá teimum, sum fóru undan okkum. Onkur vil nevna tað kognitión, ið er eitt fatanarmynstur, sum er pjøssað saman út frá teimum fortreytum og teirri tankagongd, sum fólk hava havt ymiskar tíðir, og samsvarar tað eisini við tíðarbundnan kunnleika, mentalitet og logikk.[1]

## Sambandið við tað yvirnatúrliga

Konsistensurin ella høpið hevur kanska ikki altíð samsvarað við hugsanarháttin seinni, men tað hevur verið teirra veruleiki, sum tá livdu. Vit menniskju hava ein eksistentiellan tørv á at síggja alt í einum høpi. Leingi hekk tað supranormala, sum í dag verður roknað sum pátrúgv, uppi í hesum. Vit skulu ikki so langt aftur í tíðina, har pátrúgvin hevði ein týdningarmiklan instrumentellan týdning í samskiftinum hjá menniskjuni við sítt umhvørvi bæði so og so.[2] Tað gav teimum eina kenslu av at hava ein aktivan leiklut í samspælinum við tað náttúruumhvørvi, sum tey eisini kendu seg sum partar av og høvdu virðing fyri.

Sambandið við tað supranormala ella tað yvirnatúrliga varð ritualiserað í verki og lagt niður í eina ávísa atferð, alt fyri at tryggja almenna eydnu, veiðieydnu og tað, at tað framhaldandi skuldi vera nóg mikið til av tí, sum tú veiddi, og at tað, sum tú sáddi, fór at frukta.[3]

Tað ráddi til dømis um at varðveita mjólkareydnuna ella fiskieydnuna, men eisini tá farið var í bjørgini, til útróðrar og seinni eisini til skips – í mongum førum kom gudstrúgvin eisini uppí.[4]

Pátrúgvin við sínum ritualum gav meining í eini aktivari samvinnu við náttúru og við umhvørvi og við tað tilfeingi, sum tey kundu troyta.

Tí mátti farast væl og skynsamiliga um alt, bæði í verki, men eisini í málburði, og tú mátti ikki hava orðið á nøkrum, sum kundi broyta javnvágina.

Tað var í roynd og veru tað, sum alt var um, nevniliga at tryggja sær, at kúgvin mjólkaði, at ▶

1 Tylor ed 1969.
2 Joensen 2975,1981, 2020.
3 Joensen 2020, 40 ff.
4 Joensen 2020, 50 ff.



*Hava fiskifrøðingar rætt í øllum sínum metingum, er ivasamt um uppsjóvarfiskiskapur á okkara leiðum er burðardyggur. Mynd: Maria Olsen*

Taka vit saman um tann forna hugsanarháttin, var í honum meira enn ein farri av tí, sum í okkara tíð verður nevnt *sustainability, bæredygtighed* ella tað, sum vit nevna *burðardygd*. Sagt stutt, merkir tað, at vit skulu ansa eftir og fara væl um jarðarknøttin, so okkara lívsháttur ikki verður umhvørvinum til ampa, og at vit framhaldandi varðveita tað, sum vit hava í góðum standi, bæði fyri okkum sjálvi og fyri tey, sum koma aftaná.

Her er í roynd og veru einki nýtt undir sólini, tí soleiðis hava fólk hugsað í øldir, tó so, mistøk hava fyrr eisini verið gjørd móti náttúruni, men mest tí fólk ikki hava vitað betur.

Broyting kemur ikki í henda forna hugsanarhátt, fyrr enn vit fara at nærkast okkara tíð. Tað er nýggja hugmyndin um, at tað er nóg mikið til av øllum hjá okkum at troyta. Hetta hongur møguliga saman við kapitalismu og einum ynski um framhaldandi búskaparligan framburð.

fiskurin kom aftur á grunnarnar, og at tað slapst undan fellisárum og fiskaloysi.

Pátrúgvin var, sum longu nevnt, ofta tað instrumentið, sum nýtt var fyri ikki at broyta javnvágna ella *status qvo*, tí høvdu tey mangt fyri, sum í okkara tíð tykist løgið, men sum gav meining hjá teimum.

Tað ráddi um ikki at lorka nakað burtur við óhóskandi atferð, men um at knýta alt saman fyri at fáa áhald ella kontinuitet, serliga har, sum vandi var á ferð, og okkurt var at missa.

## Javnvág og burðardygd

Í dag eru onnur instrument komin í staðin, eitt nú at eta økologiskt og burðardygt. Onkur sigur kanska, at hetta er ein partur av okkara biologisku atferð at bera okkum soleiðis at.

Tað eru antropologar, sum hava borið hetta saman við tað, sum verður nevnt *zero-sum-game*, sum m.a. merkir, at tað, sum ein vinnur, tað missir ein annar, tí var javnvágin av størsta týdningi, tí mark var fyri øllum, um skil skuldi vera í, og fyri at øvundsjúka, við øllum tí, sum hekk uppi í henni, ikki skuldi fáa vald.[5]

Alt var kanska ikki rætt og skilagott, tí fyrr dugdu tey ikki altíð at síggja náttúruvísindaligu sambondini, men tað var eitt ávíst skil í teirra logikki.

## Svabo breyt við forna vanahugsan

Flestu kenna navnið Jens Christian Svabo. Svabo, ið var eitt umboð fyri ta sonevndu upplýsingartíðina, ber fram eitt og annað, sum bendir á ein nýggjan hugsanarhátt. Hann helt ikki nógv um fornan hugsanarhátt, og serliga ikki um tað, sum hevði við pátrúgv at gera. Eitt nú skrivar hann í kendu frágreiðing síni frá umleið 1780 eitt brot um *„Fiskeriets Hindringer*". Ein forðing í hesum sambandi var óttin fyri at fiska havið tómt. Svabo var væl lisin og vísti á henda óttafulla hugsanarhátt, ikki bert í Føroyum, men eisini aðrastaðni.

Lat meg endurgeva brot úr tí, sum Svabo skrivar um 1780, um óttan fyri, at høvini skulu tømast: *„at Oceanet selv, endog kunne udtømmes for Fisk, om man ikke, omend dermed holdt en Slags Ekonomie. Jeg forbigaar de Forigtighes Regler, hvorved de fornuftigste Statsmænd iblandt oplyste Folk have stræbt at betrygge deres nation varige Rigdomme af de Have, der omskylle disse Kyster, ved at frelse Yngelen, og kun fange de voxne Fiske, og det formedelst bestemte maskers brug.*"[6]

Hann vísir eisini á, at teir í bretska parlamentinum settu reglur fyri minstamátið á tí fiski, sum skuldi kunna veiðast og seljast, og vísir á, at fiski-

5 Foster 1969.
6 Svabo 1959, 110

menn vórðu revsaðir, um teir ikki hildu reglurnar, men sigur hann *„Saavidt ere disse Øer ikke komme, at man kunde tænke paa denne Politiks Anvendelse."*[7]

Svabo er ikki sørt speiandi um henda óttan, og hann ger eisini gjøldur burturúr, at tá tað um agn ráddi, tvíhildu føroyingar um fiskabeituna, sjálvt um teir vistu, at fiskur tók betur krækling og sild enn beituna.[8]

Føroyingar sendu løgtinginum klagu um skotar, sum brúktu sild til agn, tí tað gjørdi fiskin til ein kræsnan óvenjing, sum ikki vildi taka fiskabeitu teirra.[9] Tað órógvaði tað, sum hevði verið, og tað sama hildu nógvir, tá línan kom, og hon varð tí bannað á ávísum firðum.



*Fiskaaling sum heild verður hildin at vera burðardygg. Men enn vita vit helst ov lítið um hvørjar avleiðingar tað fer at fáa fyri laksastovnarnar, at aldur laksur sleppur út úr nótunum. Mynd: Magnus Torvanger*

## Grammleikin má tálmast

Ikki tykkum at siga, so hvarv hesin forni hugsanarhátturin rættiliga skjótt úr tilvitinum, men hann helt sær umborð á sluppunum næstan alla slupptíðina. Hann er nú farin meira ella minni – helst ótilvitað – at hanga uppi við fiskifrøðingum í eini meira modernaðari náttúrusøguligari útgávu.

Eitt tað fyrsta, sum vit í Føroyum merktu av hesum nýggja ótømandi hugarákinum, var, at bretskir trolarar fóru at trola heilt inn undir klettin og fóru við øllum fiskinum, og tað gekk út yvir útróðurin og førdi til, at føroyingar fóru at keypa skip og fóru aðrastaðni at fiska. Vit gjørdust partur av tí sama.

Hinvegin er nú meginparturin av vísindini um at finna inn aftur á ta gomlu rásina og vísa á, at grammleikin má tálmast fyri at varða um burðardygdina, at $CO_2$ útlátið má tálmast, tí veðurlagsbroytingarnar gera, at vit skjótt eru um ein háls og standa undir í vatni og sjógvi.

Men enn eru tað mong, sum hava sera torført við at sleppa eini tankagongd um markloysi, sum í roynd og veru ikki hevur meira enn eini 250 ár á baki. Í hvussu so er ikki við tað fyrsta og ikki so leingi, sum onnur ikki gera tað. Upplýsingarmaðurin Jens Chr. Svabo fekk ikki rætt; tað, sum hann speirak fyri 250 árum síðani, vísir seg ikki at vera so býtt kortini. Tað ber kanska til at tøma havið, um ikki ansað verður eftir. Tað er eitt mark fyri øllum, og har eru vit í dag.

7 Svabo 1959,110
8 Svabo 1959,93.
9 Svabo 1959,93.

## Bókmentir


Foster, G. M 1965: Peasant Society and the Image of Limited Good. American Anthropologist 67:2.

Joensen, Jóan Pauli 1975: Færøske sluppfiskere. Etnologisk undersøgelse af en erhvervsgruppes liv. Tórshavn.

Joensen, Jóan Pauli 1981: Tradition och miljö i färöiskt fiske, I Tradition och miljö. Et kulturekologisk perspektiv. Lauri Honko och Orvar Löfgren, ed. Liber. Lund.

Joensen, Jóan Pauli 2020: Ketilostur, maðurin umborð og putursukurveðrar. 50 ár sum fólkalívsfrøðingur. Sprotin

Svabo, Jens Chr 1959; Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781-1782. Udgivet af N. Djurhuus. Selskabet til Udgivelse af færøske Kildeskrifter og Studier. København.

Tyler, A, Ed. 1969; Cognitive Anthropology. New York.

# Verkið og *listakvinnan*

Kolbrún í Haraldsstovu, sum eisini kallar seg Kolbrúnarlist, er plantuvistfrøðingur. Hon letur yrki sítt seta dám á verkini.

Hon er hugtikin av tí, sum goymir seg handan sjóneykuna, lívrunnar bygnaðir og lívverur, sum ikki hómast við berum eygum.

Eisini fær hon íblástur úr náttúruni, og hetta verkið, sum var gjørt til ráðstevnuna í fjør um náttúrufatan, er ein samanrenning av báðum.

Verkið ímyndar ein lívrunnan garð úr kyknum, eitt netverk, sum er grundarlagið undir tí, vit kalla náttúra. Uttan mun til, hvør okkara náttúrufatan er, so eru tað tær ósjónligu lívverurnar, kyknurnar og lívfrøðiligu tilgongdirnar, sum saman skapa ta náttúru, ið vit fegnast um.

